

# KVALITATIV LESIVANAKANNING 2020-22

**Frágreiðing um lesivanar hjá børnum – børn greiða frá**

Lydia Didriksen, Sissal M. Rasmussen og Turið Kjølbro

**Fororð** . . . 7
Lesiførleiki sum lykil . . . 8

**Lýsing av lesivanakanningini 2017-18 – teirri kvantitativu** . . . 9
Tilmæli út frá kvantitativu kanningini . . . 12

**Lýsing av lesivanakanningini 2020-22 – teirri kvalitativu** . . . 13
Háttalag . . . 13
Støðulýsing . . . 14
Arbeiðsháttur í greiningini . . . 14

**Greining og úrslit** . . . 15
Lesing í skúlanum . . . 15
Lesing í skúlatíðini – í flokshølinum . . . 15
Upplestur av skúlatingum – í flokshølinum . . . 16
Upplestur av søgu – í flokshølinum . . . 16
Lesiátøk – í skúlatíðini . . . 17
Samanumtak . . . 17

**Lesingin uttan fyri skúlan – í frítíðini** . . . 19
Lesingin heima . . . 19

**Lesikveikjarar** . . . 21
Vaksin sum lesikveikjarar . . . 21
Vinir og floksfelagar sum lesikveikjarar . . . 22
Tosa lítið um lesing . . . 22

**Hugburður til lesarar og tað at lesa** . . . 24

**Tilfar** . . . 26
Á pappíri ella skíggja? . . . 26
Hvat lesa tey? . . . 27
Hvat tíma tey at lesa? . . . 28
Hvat er ein góð bók? . . . 29
Hvussu velja tey? . . . 29
Á hvørjum máli lesa tey? . . . 30
Hvørjar miðlar brúkar tey? . . . 31

**Skúlabókasavnið** . . . 33
Frílesing og skúlabókasavnið – í skúlatíðini . . . 33
Skúlabókasavnið og miðling . . . 34

**Samanumtak** . . . 36
Næmingar og teirra hugburður til lesing . . . 36
Hvat næmingar siga um útboðið av bókum at lesa . . . 37
Hvussu næmingarnir brúka og fata skúlabókasavnið . . . 37

**Øki, ið krevja serligt uppmerksemi** . . . 38
Munurin á talumáli og skriftmáli . . . 38

**Skúlin sum vitanarberi** . . . 40
Faktatekstir og tilognan av vitan . . . 40
Skúlin sum mentanarberi . . . 40
Munnliga frásøgnin týðandi mentanartáttur . . . 41
Í nýggjari tíð . . . 41
Frásøgn og upplestur sum mentanarberi . . . 41

**Týdningurin sum skaldskapur hevur fyri okkum sum menniskju** . . . 43
Skaldskapur styrkir felagsskapin . . . 44

**Lykil til framtíðina** . . . 45
Gransking og menning . . . 45
Íblástur til nýggjar kanningar . . . 46

**Felags stev í lesing við lesiætlan** . . . 47

**Kjarnuøki** . . . 49

**Niðurstøða** . . . 50

**Keldulisti** . . . 52




*Kvalitativ lesivanakanning 2020-2022*
*Frágreiðing um lesivanar hjá børnum - børn greiða frá*
Skrivað hava: Lydia Didriksen, Sissal M. Rasmussen og Turið Kjølbro
Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur fíggjað kanningina.

ISBN: 978-99918-3-727-7

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**„Tað er og hevur altíð** verið átrokandi neyðugt, at menniskjan skilir seg sjálva og medmenniskju síni. Tað finst eyðvitað ein hópur av fólki, ið er til reiðar at svørja uppá, at tey skilja seg sjálv og medmenniskju síni betur enn væl. Til hesi menniskju má svarast eitt hart og ávarandi nei. Tí at tað kegl og stríð, allar tær beistagerðir, øll tey kríggj, ið eru framd gjøgnum mannasøguna til í dag, koma nettupp av hesum, at vit skilja og kenna ikki okkum sjálv og okkara medmenniskju. Og vit kunnu leggja afturat, at tað hevur ongantíð verið so neyðugt at kanna okkum sjálv, sum í hesi teknisku øld við øllum hennara maskinum og oyðingarvápnum. Seta okkum hesar spurningar, hví eru vit soleiðis, sum vit eru? Hví hata vit? Hví kunnu vit ikki liva saman við friði? Hví kríggjast vit? Hví liggja vit og pína hvønn annan til deyðis í fangatippum? Hví fremja vit dag um dag hesar ósiðiliga ræðuligu beistagerðir? Og hví eru sokallað kristin menniskju ikki smettin mætari enn sokallað heiðin, tá ið til skal takast? Og størsti spurningurin av teimum øllum er kanska hesin: Er tað vist, at tað, ið vit halda vera „gott“ og „satt“ ið í roynd og veru er so „gott“ og „satt“?

Svarið upp á allar hesar spurningarnar finna vit einans um vit læra okkum sjálv at kenna. Gjøgnum sjálvrannsakan búnast vit fram til størri toliransu og tollyndi. Tá læra vit at skilja, at vit mugu tola, at tað finnast menniskju, sum eru øðrvísi enn vit, ið hava aðra áskoðan, annan lit, annan livihátt, aðra trúgva, aðra mentan, aðra samfelagsskipan og so framvegis, og vit hava ongan rætt og onga atvold at knúlva tey niður, tí tey hugsa, trúgva, og eru øðrvísi enn vit.

Hvar skulu vit læra sjálvrannsakan? Hvar skulu vit læra okkum sjálv at kenna? Millum annað gjøgnum listina, og serliga gjøgnum listagreinirnar, skaldskap og teatur. Har fáa vit at vita, hví tann elsta prinsessan í ævintýrinum, hon sum var so ljót, var órein og ill og vildi teirri yngstu prinsessuni til lívs. Har fáa vit – og fyrigevið, at eg aftur nú fari at tríva í tann hátíðarliga tónan – men har fáa vit, um vit lurta og lesa rætt, svarið uppá, hví vit eru ónd, og hví vit eru góð. Men skilast skal til tíverri, at vit einki beinleiðis svar fáa. Vit mugu leita okkum fram til tað, búnast fram til tað. Eru vit eru andaliga løt, so steðga vit í vøkstrinum og fáa ongantíð greiðu á nøkrum. Fara gjøgnum lívið við botni fyri eygunum, síggja einki, hoyra einki, skilja einki, hóast vit halda okkum síggja, hoyra og skilja. Har, sum andiligt leti valdar, grør mannakuldin og verður til tær vondu girnir, vit rópa nasisma, fasisma, rasisma, chauvinisma o.fl.a.“

*Brot úr greinini „Fagrar bókmentir“ frá 1968*
*eftir rithøvundin, Jens Paula Heinesen.*

# Fororð

**Í nógv ár hava** vit hoyrt lærarar og skúlafólk siga, at børn og ung nú á døgum lesa minni og minni, og at tey heldur vilja vera á netmiðlum enn at stytta sær stundir við eini bók. Lesi- og miðlavanarnir hjá børnum og ungum *eru* broyttir munandi um somu tíð, sum útboðið av talgildum tilboðum og talgildum tólum er vaksið og við tíðini eru vorðin ein fastgrógvin og natúrligur partur av gerandisdegnum hjá børnum og ungum í dag. Hetta er eisini ein gongd, sum sæst í londunum rundan um okkum. Lætta atgongdin til internetið og ein broytt mentan hava havt ávirkan á, hvussu nógv og ofta børn lesa í frítíðini.

Í *kvantitativu lesivanakanningini í 2017-2018* síggja vit, at stórur partur av føroysku børnunum ikki lesa javnan, tað vil siga fleiri ferðir um vikuna, og at tey lesa minni og minni, jú eldri tey blíva.

Aftaná at hesi úrslitini vóru komin í ljósmála, og at vit við týðiligum tølum sóu, at lesing ikki er partur av dagligum virksemi hjá føroyskum børnum og ungum, settu vit okkum fyri at fáa úrslit til vega, sum kundu kasta ljós á, hví so er. Í *kvalitativu lesivanakanningini í 2020-2022* settu vit okkum fyri at kanna hetta. Áhugin fyri evninum kemst av, at vit arbeiða við undirvísing og bókaútgávu – ella lesing í breiðasta týdningi, og tað hava vit gjørt meginpartin av okkara arbeiðslívi. Motivatiónin fyri at fara í gongd við kanningarnar var upprunaliga at gera eitthvørt munagott átak at varpa ljós á týdningin at lesa, at fáa lesing at verða ein meiri sjálvsagdan part í gerandisdegnum hjá øllum børnum og sum heild leggja upp til eina betri lesimentan í skúla, heima og almenna rúminum. Men vit vóru tó skjótt á einum máli um, at skuldu vit seta orð á, hvat eigur at verða gjørt, so mugu vit vita, hvussu støðan er.

At gera lesivanakanningar er drúgt arbeiði; ikki bara at fáa til vega fígging, tí tað tók langa tíð, men ikki minst at orða neyvar spurningar, seta okkum í samband við skúlar og lærarar, samskipa innsavningina av dátunum, viðgera og greina dáturnar og so framvegis.

Ein týðandi partur í fyrireikandi arbeiðnum er at royndarkoyra kanningarnar í ymsum skúlum. Ein annar partur er at gera av, hvørjar árgangir vit skulu hava við í kanningini, og um børnini skulu svara spurningum á pappíri ella talgilt. Tvær ferðir hava vit verið á gátt á Lesisentrinum í Stavanger, stóra granskingarstovninum, ið er vorðin til orsakað av vánaligum úrslitum í lesing í PISA-kanningum. Umframt at granska arbeiðir stovnurin miðvíst við at fáa lesing at verða natúrligur partur í lívinum hjá øllum norðmonnum, eins og tey eisini granska í lesing og lesivanum. Fremsti granskarin í stóru PIRLS-kanningunum og tann, sum hevði ábyrgdina av hesi stóru kanningini í nógv ár, Egil Gabrielsen, hevur verið okkum hentur. PIRLS-kanningarnar verða gjørdar í 60 londum, og tær hava til endamáls at kanna lesingina hjá næmingum í fjórða flokki. Spurningarnir, vit hava orðað til lesivanakanningina, eru orðaðir við støði í PIRLS-spurnabløðunum.

Umframt at ráðføra okkum við navnframa norska granskaran var tað so heppið, at ein stór, donsk kvantitativ lesivanakanning varð gjørd um somu tíð sum okkara. Hóast tann danska fevnir um fleiri árgangir enn tann føroyska, hava vit í ein mun lagað spurningarnar í føroysku kanningini soleiðis, at

ávísir spurningar kunnu samanberast. Í Danmark gjørdu tey eisini eina kvalitativa lesivanakanning í kjalarvørrinum á tí kvantitativu.

### Lesiførleiki sum lykil

Lesiførleiki er eitt amboð og vegurin inn í flestu lærugreinar í skúlanum. Hesin førleikin er grundleggjandi, tá ið tú skalt nema tær lærdóm og vitan. PISA-kanningarnar hava víst, at ein ov stórur partur av okkara børnum dugir ov illa at lesa, hóast lesing er ein av fortreytunum fyri at vera virkin í samfelagnum og er grundarlagið, sama um tú velur at fara í miðnám ella undir eina handaliga útbúgving, ella okkurt heilt annað. Harumframt er lesing vegurin inn í bókmentirnar, bæði yrkis- og fagurbókmentir, sum kunnu geva okkum menniskjum eina rúgvu av vitan og upplivingum. Lesing er ein ótømandi kelda til gleði, spenning og undirhald, men eisini eitt stað, har barnið kann lesa um ymiskar kenslur og tankar og ymsar støður, vit sum menniskju kunnu koma í. Hetta ger, at barnið lættari kann kenna seg sjálvt aftur og læra onnur at kenna; tað víðkar sjónarringin og lærir nýggj hugtøk, ið er neyðug undanvitan fyri lesifatan. Skal barnið gerast ein góður lesari, er neyðugt at lesa nógv og ymiskt tilfar á tí støði, har barnið er. Barnið hevur tørv á, at torleikastigið í tekstunum, tað lesur, alla tíðina hækkar samsvarandi aldursstiginum og førleikastiginum hjá barninum. Tí er neyðugt við hóskandi tilfari, og hetta er júst endamálið við útgávunum hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags og Námi: at børn hava nógv dygdargott tilfar á føroyskum at velja í, á ymiskum torleikastigi og eftir ymiskum áhugamálum. Tó er ikki vist, at hóast barnið dugir at lesa, tað vil siga dugir teknisku lesiførleikarnar, at tað gerst lesari.

Lesiførleiki og málførleiki hanga saman. Báðir førleikar hava týdning fyri, hvussu tað einstaka barnið klárar seg í lívinum, tí málførleikin er ein av hornasteinunum í sosialum sambondum, útbúgving og luttøku í samfelagnum. Tað ber tískil til at betra um málførleikan ígjøgnum lesing og eisini at betra lesiførleikarnar við at lesa nógv, og tí er tað týdningarmikið at fáa ítøkiliga vitan um lesivanar til vega.

Ein avleiðing av, at børn lesa lítið kann vera, at tey ongantíð læra at lesa flótandi og raðið. Um tú lesur seint, ávirkar tað eisini hugin hjá tær at lesa. Eldri børnini gerast, truplari verða tekstirnir, tey skulu lesa, bæði tá ið talan er um setningsbygnað, innihald og orðfeingi. Skriftmálið er samansett, og um børn ikki lesa og tískil møta skriftmálinum, so menna tey ikki orðfeingið, og tey megna ikki at lesa abstraktan tekst.

Børn læra sítt ella síni móðurmál gjøgnum samskifti við onnur longu frá móðurlívi. Samskiftið, ið barnið hevur við onnur frá tað er føtt, hevur stóran týdning, og barnið mennist málsliga við at hoyra mál, bæði talu í samskiftinum við onnur og gjøgnum upplestur. Lesing, bæði upplestur og tá barnið sjálvt seinni dugir at lesa, hevur týdning, tí menningin av málførleikanum m.a. er kjølfest í skriftmálinum, har bæði setningsbygnaður og innihald eru kompleksari, og fleiri abstrakt orð koma fyri. Fyri at menna orðfeingið soleiðis, at barnið kann ogna sær góðan, ríkan og djúpan málførleika, krevst, at barnið hoyrir og sær orð aftur og aftur, og at torleikastigið í tekstunum, tað lesur, alla tíðina hækkar samsvarandi aldursstiginum og førleikastiginum hjá barninum. Barnið, sum lesur, hevur betri orðfeingi og lættari við at skilja tekst og orða seg, bæði í talu og á skrift. Skriftmál er meira komplekst enn talumál og hevur ríkari orðfeingi; tá børn lesa ella hoyra skrivaðan tekst, kann hetta lyfta teirra egna málførleika á hægri stig – bæði í talu og skrift.

Tað er okkara vón, at úrslitini og niðurstøðurnar úr báðum lesivanakanningunum verða brúkt til at menna lesimentanina í okkara samfelag. Í hesi frágreiðingini taka vit aftur í aftur nøkur av úrslitunum frá teirri fyrru kanningini, teirri *kvantitativu*. Hendan byggir á hagfrøðilig úrslit, sum taka støði í svarunum frá einum stórum parti av børnunum í 4., 6. og 9. flokki, meðan hesi nýggju úrslitini, frá teirri *kvalitativu*, geva okkum eina djypri fatan av, hvussu einstaka barnið fatar lesing sum part av sínum gerandisdegi, bæði tá ið talan er um hugburð, atferð og tilgongd til tilfar og ymsu pallarnar, har tey ferðast. Uppleggið er, at avvarðandi stovnar og myndugleikar, tað eru bókasøvn, lesivegleiðarar, skúlabókavørðir, lærarar, foreldur og tey, sum varða av hesum økjum, kunnu brúka úrslitini sum grundarlag undir at menna tilboð til børn og ung, og sum amboð at gera nýggjar menningarætlanir innan skúlagátt, so tað verður eitt felags mál at skapa lesigleði og eina lesimentan hjá okkara børnum og ungu.

Góðan lesihug!



# Lýsing av lesivanakanningini 2017-18 – teirri kvantitativu

**Fyrra lesivanakanningin**, tann kvantitativa kanningin, verður umrødd fleiri ferðir í hesi frágreiðingini; tí greiða vit frá nøkrum av úrslitunum (*talvurnar úr kvantitativu kanningini hava somu nummur sum í upprunaútgávuni*).

Kvantitativa lesivanakanningin var gjørd í 4., 6. og 9. flokki í tíðarskeiðinum november 2017 til februar 2018. 1277 næmingar tóku lut; tað svarar til umleið 84 % av næmingunum í hesum trimum árgangum. Hetta vóru næmingar í 84 flokkum í 19 stórum, miðalstórum og lítlum skúlum um alt landið; kynsbýtið var 49 % gentur og 51 % dreingir.

*TALVA 1 Næmingar býtt á flokkar*

| Flokkar | Næmingar í alt | Næmingar luttikið í kanningini | Svarprosent |
|---|---|---|---|
| 4. fl. | 464 | 329 | 71 % |
| 6. fl. | 528 | 465 | 88 % |
| 9. fl. | 520 | 483 | 93 % |
| Í alt | 1512 | 1277 | 84 % |

Næmingarnir svaraðu 26 spurningum, sum í høvuðsheitum eru býttir sundur í *lesing í skúlanum* og *lesing í frítíðini*.

Niðurstøðan í teirri kanningini er, at tveir triðingar av næmingunum siga seg ongantíð ella sjáldan lesa bøkur í frítíðini, meðan fjórði hvør sigur seg lesa hvønn dag ella fleiri ferðir um vikuna, og áttandi hvør fleiri ferðir um mánaðin. Triði hvør næmingur í 4. flokki lesur í frítíðini, men bara áttandi hvør í 9. flokki; hetta er ein sera stór minking. Tá ið borið verður saman við Danmark, sæst, at føroyskir næmingar lesa munandi minni enn teir donsku næmingarnir, í summum førum ikki meiri enn eina góða helvt av tí, sum tey lesa í Danmark.

Næmingarnir vóru eisini spurdir um, hvat teimum dámar best at lesa. Sum heild eru best umtóktu bøkurnar spenningssøgur, bøkur um søgur frá veruleikanum og stuttligar bøkur, men eisini krimi,

16. HVUSSU OFTA LESUR TÚ BØKUR Í FRÍTÍÐINI (IKKI SKÚLATING)



fantasi og ævintýr eru vælumtókt. Hyggja vit at kynsbýtinum, so líkist myndin, men gentum dámar betur spenningssøgur, ævintýr, søgur um vinir og søgur um kærleika enn dreingjum. Dreingjum dámar betur faktabøkur.

Tá ið talan er um, hvat tey vilja lesa, so siga ikki minni enn 60 %, at tey høvdu lisið meiri, um bøkur vóru um evni, sum hava teirra áhuga. Nærum helmingurin sigur, at um tey vistu onkra góða bók, so høvdu tey lisið meiri, og 13 % høvdu lisið meiri, um tey dugdu betur at lesa.

Flestu børnini lesa á føroyskum. 66 % siga, at tey lesa ofta ella sera ofta á føroyskum. Talið á teimum, sum lesa á donskum, er 31 % fyri somu bólkar. 49 % lesa ofta ella sera ofta á enskum. Dreingir lesa minni enn gentur á føroyskum, men lesa meiri á enskum enn genturnar. Genturnar lesa meiri á donskum enn dreingirnir. Tá ið ræður um flokkarnar, sæst, at tey í 9. flokki lesa nógv meiri á enskum enn hinir árgangirnar, og tað at lesa á føroyskum minkar, jú eldri næmingarnir gerast; tað danska er umleið tað sama yvir allar árgangirnir. Tey, sum lesa nógv í frítíðini, lesa eisini meiri á føroyskum og á donskum, men tey, sum lesa lítið ella einki, lesa oftari á enskum, enn tey, sum lesa nógv.

Samband er eisini millum, hvussu ofta tú lesur, og hvussu nógv tú brúkar ensk orð í samskifti við onnur. Um hugt verður at ensku málnýtsluni og lesing, sæst, at tey børnini, sum lesa nógv, ikki brúka ensku orðini líka nógv, sum tey, sum ikki lesa. Av teimum, sum lesa nógv, sigur fimti hvør seg brúka ensk orð, tá ið tey ikki kenna føroyska orðið, meðan talið hjá teimum, sum ikki lesa, er triði hvør.

Pappírsbókin er nógv betur umtókt enn skíggin sum lesiamboð. Ikki minni enn 64 % siga seg vilja lesa í pappírsbók, og 14 % svara telefonin sum besti miðilin. Bara 5 % svara, at teldilin er best, 8 %, at teldan er best, og 8 %, at teimum dámar best at lurta eftir ljóðbókum og líknandi. Gentum dámar betur enn dreingjum at lesa á pappíri. Hinvegin dámar dreingjum betur at lesa á teldu. Um hesi svar verða sammett við flokkarnar, so er lítil broyting í; tó dámar teimum eldru betur at lesa í telefon samanborið við tey yngstu í fjórða flokki. Tá ið sammett verður við tey, sum siga seg lesa í frítíðini, og tey, sum ikki lesa, so er munurin tann, at teimum, sum dámar at lesa í frítíðini, dámar betur at lesa á pappír. Hinvegin dámar teimum, sum ikki lesa í frítíðini, betur at lesa á ymsum øðrum miðlum heldur enn pappíri, hóast munurin ikki er so stórur.

Samanbera vit tey, sum siga seg lesa hvønn dag, og tey, sum ikki lesa, sæst týðiliga, at tey, sum ikki lesa, nýta talgildu miðlarnar nógv meiri enn tey, sum lesa.

Tá ið tølini verða samanborin fyri tey, sum siga seg lesa nógv í frítíðini, og tey, sum ikki lesa, sæst, at hjá teimum, sum lesa nógv í frítíðini, so lesa foreldrini eisini; 76 % svara, at foreldrini lesa heima. Hjá teimum, sum ikki lesa, er hetta talið 57 %.

Onnur týðandi úrslit í kvantitativu kanningini eru, at stórur munur er á, hvussu nógv børnini læna bøkur á bókasavninum. Tá ið hugt verður at flokkunum, sæst, at tey í 4. og 6. flokki læna nokk so nógv, meðan tey í 9. flokki læna nógv minni. Í teimum báðum yngru flokkunum liggur talið um 50 %, meðan tað í 9. flokki er bara 9 %. Um bókasavnsvitjanirnar verða samanbornar við, hvussu ofta tey lesa, sæst – og tað er eisini væntandi – at tey, sum lesa nógv, eru títtari gestir á bókasøvnunum, munurin er 55 % og 25 %.

Lesing og hugburður til lesing eru tætt knýtt hvør at øðrum. Tá ið spurningurin um hugburð til lesing verður settur saman við flokki, kyni og hvussu ofta tey lesa, sæst millum annað, at

**15. HVUSSU OFTA LÆNIR TÚ BØKUR Á BÓKASAVNINUM AT HAVA HEIM VIÐ AT LESA? –** ***Fleiri ferðir um mánaðin***




gentur hava ein meiri jaligan hugburð til lesing, og at tær eisini oftari halda seg fáa nakað burtur úr lesingini.

Eitt úrslit úr kvantitativu lesivanakanningini, sum var sera áhugavert, var munurin á flokkunum, sum lógu í toppi, og flokkunum, sum lógu í botni, tá ið talan er um lesitíttleika og hugburð. Hyggja vit at variablinum kyn, so eru fleiri gentur í flokkunum, sum liggja í topp 10 enn botn 10, og hyggja vit at variablinum hvørji mál, tað vil siga, hvørji mál verða tosað heima, so hava flokkarnir í topp 10 fleiri næmingar, sum bara tosa føroyskt heima. Millum topp 10-flokkarnar eru tað 28 % av børnunum, sum læna bøkur á bókasavninum næstan hvønn dag ella fleiri ferðir um vikuna í mun til 9 % í botn 10. Eisini talið av bókum í heiminum er ein signifikantur variabul fyri, um flokkarnir eru í toppi ella botni. Tað eru eisini fleiri børn, sum lesa á føroyskum í frítíðini (tá ið alt verður talt við) í topp 10 enn í botn 10. Tað eru fleiri børn, sum fáa hjálp frá foreldrum til at finna bøkur at lesa millum teirra í topp 10, samanborið við í botn 10.

Eyðkenni fyri flokkarnar, sum liggja í topp 10, tá ið talan er um lesitíttleika og jaligan hugburð:

- hava størri part av gentum í flokkinum
- fleiri tosa bara føroyskt heima
- tey eiga fleiri bøkur
- børnini fáa meiri hjálp til skúlating
- tey brúka minni tíð til teldu og teldil
- tey brúka ikki líka ofta ensk orð, tí tey ikki kenna føroyska orðið
- tey lesa meira á føroyskum
- tey læna oftari bøkur

*Kvantitativa lesivanakanningin 2017-2018* og *kvalitativa lesivanakanningin 2020-2022* verða í hesi frágreiðingini eisini umrøddar sum ávikavist fyrra lesivanakanningin og seinna lesivanakanningin. Øll tann kvantitativa lesivanakanningin sæst á heimasíðuni www.malmenning.fo.

# Tilmæli út frá kvantitativu kanningini

**Eftir at vit lótu** Mentamálaráðnum frágreiðingina um kvantitativu lesivanakanningina í 2018, vórðu vit bidnar um at orða tilmæli og átøk út frá úrslitunum. Átøkini skuldu hava til endamáls at fremja lesihugin.

Ítøkilig uppskot:

1. **Kvalitativ kanning.** Gera dýpandi kvalitativa kanning við støði í lesikanningini 2018, har ið kannað verður nærri, hvat býr undir ávísum úrslitum í lesikanningini.
2. **Eftirútbúgving.** Námsfrøðingar og lærarar eiga at fáa eftirútbúgving (skeið) um málsligu menningina hjá barninum, hvat býr í hugtakinum „lesihegni", og hvønn týdning orðfeingi hevur fyri lesiførleika. Somuleiðis um gongdar arbeiðshættir í praksis at menna nevndu førleikar.
3. **Tilfar.** Útgáva av bókum til børn og ung eigur at verða økt munandi, soleiðis at einhvør lesari fær møguleikar at finna „røttu" bókina.
4. **Skúlabókasøvn.** Skúlabókasøvnini eiga at verða raðfest nógv hægri. Útbúgvin starvsfólk eiga at verða tøk í skúlunum at hjálpa barninum at finna „røttu" bókina.
5. **Skipað lesing í skúlanum.** Skúlar eiga at raðfesta lesiløtur, lesivikur og tiltøk, sum hava til endamáls at fáa børn at lesa meiri.
6. **Føroyar lesa 2020.** Landsumfatandi lesiátak, sum varpar ljós á bókina sum týðandi mentanarambоð og vitanarbera.
7. **Kunning og miðling.** Ljós eigur at verða varpað á lesigleði í almenna rúminum.
8. **Kunning og miðling til børn.** Alt tilfar, ið hevur áhuga hjá yngri og eldri børnum, eigur at verða savnað á einum barnaportali.
9. **Øll børn somu møguleikar.** Kannað eigur at verða, hvat tað er, sum ger, at heilir flokkar av næmingum hava jaligan og neiligan hugburð til lesing.
10. **Lesivanakanning 2021-22.** Nýggj lesivanakanning eigur at verða gjørd í 2021-22 eftir sama leisti sum lesivanakanningin 2018.
11. **Orka verður sett av til at talgilda tilfar til pallar, sum børn brúka í dag.** Føroysk tala og tónleikur eigur at verða lagt á tilfar, sum børn brúka serliga nógv.
12. **Heiðra barnabókina.** Almennu Føroyar eiga eina ferð um árið at seta sjóneykuna á dygdargóðu barnabókina, góða lesitilfarið og tiltøk, sum fremja lesigleði.

Av teimum tólv tilmælunum, ið vórðu gjørd, eru tvey sett í verk. Annað er kvalitativa lesivanakanningin, sum fer aftur um tølini og niðurstøðurnar í teirri kvantitativu. Hitt er landsfevnandi átakið, *Føroyar lesa*, hvørs endamál er at stimbra eina góða lesimentan og at vísa á týdningin, ið lesing hevur fyri samfelagið. Hetta átakið fór av bakkastokki í september í 2020.

Tað ber til at lesa alt tilmælið um átøk, sum varð handað landsstýriskvinnuni 3. desember 2019, á heimasíðuni www.malmenning.fo https://www.malmenning.fo/2019/12/03/uppskot-um-atoek/

# Lýsing av lesivanakanningini 2020-22 – teirri kvalitativu

Yvirskipaða endamálið við kanningini er at fáa í ljósmála, hvønn hugburð børn hava til bøkur og at lesa – og lesing sum heild. Kvalitativa kanningin hevur støði í kvantitativu kanningini frá 2017-2018 á tann hátt, at vit fara aftur um spurningarnar, sum vit settu í teirri kanningini. Meðan kvantitativa kanningin er spurnablað, sum næmingarnir sjálvir fyltu út, er kvalitativa kanningin einstaklingasamrøður og fokusbólkasamrøður, sum vit, ið hava gjørt kanningina, hava havt við næmingar. Út frá úrslitunum í fyrru kanningini valdu vit at savna okkum um høvuðsniðurstøðurnar og orða spurningarnar út frá teimum.

Beint áðrenn skúlarnir lótu aftur í mars 2020 orsakað av koronu, fóru vit undir ta kvalitativu kanningina; síðstu samrøðurnar vórðu gjørdar í november 2020. Tíðarskeiðið, samrøðurnar vórðu gjørdar, gjørdist drúgvari enn upprunaliga ætlað eitt nú orsakað av koronu.

## Háttalag

Háttalagið í kanningini er tað sama sum í líknandi kanningum, sum eru gjørdar í Norðurlondum. Kanningin er samrøður andlit til andlits við næmingar í 6. flokki. Eisini í hesi kanningini hava vit lagt okkum eftir at fáa næmingar til orðanna í skúlum, ið eru ymiskir í støddum, og at hava javnt kynsbýti. Vit hava havt samrøðu við 38 børn kring allar Føroyar; í tilsvarandi danskari kanning um børn og lesing er talið á børnum, ið samrøða er við, 28. Sundurgreinað hava vit havt fimm fokusbólkasamrøður við trý børn hvørja ferð í fimm skúlum, og 26 samrøður við einstaklingar í tíggju skúlum. Har skúlarnir hava fleiri enn ein sætta flokk, hava vit havt næmingar úr báðum ella øllum sættu flokkunum.

Eitt av úrslitunum í kvantitativu kanningini er, at tað er stórur munur á lesimentanini í ymsu skúlunum; eisini í sama skúla kann vera stórur munur á lesimentanini í tveimum flokkum á sama floksstigi – við øðrum orðum næmingum, sum koma úr neyvt sama umhvørvi og sum ganga hurð um hurð í sama skúla. Skuldu vit koma nærri inn á henda problematikkin og samstundis fáa næmingar um alt landið við, so máttu vit tosa við eitt stórt tal av næmingum, soleiðis at kanningin er so umboðandi sum tilber.

At tað gjørdust næmingar í 6. flokki, er tí, at tann kvantitativa kanningin vísir, at tað er um hetta mundið, at hugurin at lesa minkar munandi, um somu tíð sum nýtslan av øðrum miðlum veksur.

Vit vendu okkum til skúlaleiðslurnar í tíggju skúlum, og tær settu okkum í samband við lærarar, antin flokslærara ella lærara í føroyskum. Hesir vórðu bidnir um at velja næmingar út, sum vóru fúsir at tosa við okkum um lesing og lesivanar; vit gjørdu vart við, at tað skuldu vera næmingar, sum vóru ymiskt fyri viðvíkjandi at lesa nógv og ofta, og at tað skuldu bæði vera gentur og dreingir. Síðan settu lærararnir seg í samband við foreldrini hjá næmingunum at fáa loyvi at tosa við okkum. Til hetta høvdu vit orðað eitt bræv at senda foreldrunum við kunning um kanningina. Lærararnir fingu skrivligt samtykki frá foreldrunum.

Arbeiðið við at orða spurningarnar var drúgt. Upprunaliga høvdu vit nógvar spurningar, sum fevndu um nógv øki, men eftir at hava roynt teir í undankanningum, vóru spurningarnir tillagaðir, summir tiknir úr og aðrir komu uppí, umframt at vit minkaðu nakað um talið av spurningum tilsamans. Spurningarnir eru at meta sum ein *samrøðuleistur* (interviewguide), tað vil siga, at tosað var í øllum samrøðunum út frá somu spurningum. Vit vóru tvær til hvørja samrøðu. Undan samrøðuni greiddu vit næmingunum frá, hvussu samrøðurnar ganga fyri seg. Allar samrøðurnar vóru tiknar upp og síðan transkriberaðar. Eingin uttan vit tríggjar, sum hava gjørt samrøðurnar, hevur lurtað eftir teimum. Frá Dátueftirlitinum fingu vit at vita, at neyðugt var ikki við loyvi frá teimum at gera kanningina, tí navn á skúla og næmingi eru duld í frágreiðingini, og transkriberingarnar verða fyribeindar, tá ið arbeiðið er liðugt.

## Støðulýsing

Kanningin er ein støðulýsing av, hvussu ofta og hvussu nógv børn lesa, hvat tey lesa, hvat ein góð bók er, á hvørjum máli og á hvørjum miðli tey lesa. Eisini verður spurt um miðlavanar, hvat tey gera í frítíðini, hvussu nógva tíð tey eru á talgildu miðlunum, hvussu nógvar bøkur tey eiga heima, hvussu ofta tey læna bøkur á bókasavni, hvussu ofta tey brúka ensk orð í samskifti við onnur, hvussu tey trívast í skúlanum og mangt annað.

## Arbeiðsháttur í greiningini

Greiningin av kanningini tekur støði í transkriberingunum av bæði einstaklingasamrøðunum og fokusbólkasamrøðunum. Forritið *Nvivo* er brúkt; hetta forritið er sera væl egnað í sambandi við kvalitativar kanningar, har transkribering er ein partur. Eftir at samrøðurnar vóru transkriberaðar, vórðu kjarnuøki og kjarnuorð vald út. Út frá hesum eru dátur savnaðar um økini, vit hava savnað okkum um at lýsa í kanningini.

Út frá dátunum hava vit í frágreiðingini savnað okkum um at lýsa trý høvuðsøki:

1. Lesing í skúlanum – hvussu nógv og ofta lesa børn, og hvat vilja tey lesa
2. Lesing í skúlatíðini – bókasavnið og miðling
3. Lesing heima

Hesi trý høvuðsøki leiða okkum víðari inn á onnur týðandi øki so sum tilfar, miðlavanar, hugburð og mentan.



# Greining og úrslit

**Í greiningini av kvalitativu** lesivanakanningini 2020-2022 er serligt fokus á, hvussu børn fata hugtakið lesing og nær og hví tey lesa. Í frágreiðingini savna vit okkum serliga um tey trý økini, sum eru lýst á undanfarnu síðu: lesing í skúlanum, lesing í skúlatíðini og lesing heima.

## Lesing í skúlanum

Í hesum partinum verða úrslit viðvíkjandi lesing í skúlatíðini greinað. Lesingin í skúlanum fevnir um bæði tað, sum næmingar lesa í skúlatíðini, og tað, sum lærarar lesa upp fyri næmingunum í skúlatíðini. Tað veri seg í mállærugreinunum føroyskum, donskum, enskum, í kunningarfakunum søgu og náttúru og tøkni, eins og kristni.

## Lesing í skúlatíðini – í flokshølinum

Næmingarnir vóru spurdir um, hvussu lesingin í ymsu lærugreinunum varð skipað í tímunum inni í floksstovuni.

Tað kom fram, at í føroyskum, donskum og enskum verður ofta lisið hart upp í summum flokkum. Lærarin lesur tekstin fyri næmingunum, áðrenn teir fara heim. Næsta tíma, tá tey aftur hava lærugreinina, hava øll fyrireikað seg, og tá lesur hvør einstakur hart upp.

Aðrar tíðir verður teksturin brotin upp í smá petti, sum verða býtt út á næmingarnar, so øll ikki lesa tað sama.

Tað kemur eisini fyri, at allir næmingarnir lesa somu lektiu, og øll skulu lesa hart upp í flokkinum, meðan hini fylgja við, soleiðis at sami tekstur verður lisin upp fleiri ferðir.

Ein annar háttur, ið er vanligur, er, at næmingar sita í bólkum og lesa upp hvør fyri øðrum. Í kvantitativu lesivanakanningini kom fram, at tað at lesa upp í flokkinum er ein arbeiðsháttur, sum var eitt eyðkenni fyri flokkar í botn 10 (botn 10, tá ið talan er um, hvussu ofta tey lesa og hvønn hugburð, tey hava til lesing).

Næmingar siga:

> ***„Vit lesa sum oftast upp í føroyskum, donskum og enskum í tímunum. Øll sleppa at lesa. Mær dámar at lesa upp, tá eg eri fyrireikað.“***
>
> ***„Ja, vit skulu lesa upp. Øll lesa. Lesa tað sama umaftur og umaftur.“***
>
> ***„Vit lesa hvønn dag í onkrum fakum.“***
>
> ***„Lósu tríggjar ferð í síðstu viku. Føroyskt lesa vit næstan hvønn dag.“***
>
> *(sitat úr samrøðum)*

### Upplestur av skúlatingum – í flokshølinum

Kanningin vísti, at rættiliga nógvir lærarar lesa tað, sum næmingarnir hava fyri í fremmandamálinum enskum, í kunningarfakunum søgu og náttúru og tøkni, og í lærugreinini kristni, áðrenn næmingarnir fara heim.

Greiningin vísti eisini, at í summum flokkum verða øll skúlating lisin upp hvønn dag, áðrenn farið verður heim. Fleiri lærarar krevja, at næmingarnir fylgja við í bókini, meðan teksturin verður lisin upp. Tað kemur fram, at fleiri næmingum dámar at fáa skúlatingini lisin upp, áðrenn teir fara heim. Onnur siga, at tey tíma ikki at lesa skúlatingini heima, tí lærarin longu hevur lisið alt upp fyri teimum í skúlanum.

Í øðrum flokkum verður einki lisið upp fyri flokkinum, áðrenn tey fara heim; tey fáa fyri í fakum og skulu sjálv lesa skúlatingini heima til næstu ferð, tey hava lærugreinina.

Næmingar siga:

*„Eg haldi, at tað er altíð betri at hoyra okkurt lisið upp enn at lesa innantanna, tí tá man lesur innantanna, fær man ikki alt so væl við!“*

*„Lærarar lesa lektiuna fyri okkum, áðrenn vit fara heim. Næstan allir gera tað. Vit loysa uppgávur í tímanum.“*

*„Lærarin lesur søgu fyri okkum. Í náttúru og tøkni fortelur lærarin fyri okkum, hann lesur ikki.“*

*„Lærarin lesur upp, og vit skriva og svara nógvar uppgávur.“*

*„Hann lesur upp, so sleppi eg frá. Onkuntíð havi eg skúlating, men ikki hvønn dag.“*

*„Lærarar lesa ikki fyri okkum. Vit fáa fyri.“*

*„Lesa lektiu fyri okkum, og vit skulu fylgja við í bókini.“*

*(sitat úr samrøðum)*

### Upplestur av søgu – í flokshølinum

Greiningin av spurninginum, um lærarar fortelja ella lesa søgur/framhaldssøgur í floksstovuni, vísir greitt, at tað er sera ymiskt frá lærara til lærara, og sostatt eisini frá flokki til flokk, hvussu stórur dentur verður lagdur á tað at fortelja og lesa upp.

Næmingar siga, at onkuntíð lesur lærarin søgu ella framhaldssøgu upp fyri teimum. Aðrir næmingar siga, at teirra lærari lesur bók eftir bók upp fyri teimum, og at tey elska tað. Tað eru eisini tey, sum siga, at lærarin ongantíð lesur ella fortelur søgu, men teimum hevði dámað tað serstakliga væl, um hann las oftari upp fyri teimum. Næmingarnir eru samdir um, at tey elska at hoyra lærarar fortelja og lesa upp, tí teir duga so væl.

Næmingar siga:

*„Teir duga so væl at úttrykkja seg við brøgdum og røddini; tað ger tað so livandi.“*

*„Lesur ikki fyri okkum nú, men hann las onkuntíð fyri okkum fyrr.“*

*„Deiligt, tá onkur lesur fyri tær.“*

*„Lærarin hevur lisið fleiri bøkur upp fyri okkum; mær dámar væl at lurta.“*

*„Nei, lærarar lesa ikki upp fyri okkum … men fyrr gjørdu teir. Vit elskaðu tað!“*

*„Lærarin lesur bara onkuntíð … ikki vanligt longur.“*

*(sitat úr samrøðum)*

Sum útsagnirnar benda á, er sera ymiskt, hvat verður fortalt ella lisið upp í skúlastovunum. Tað veldst helst um, hvør lærarin er, hvønn hugburð hann hevur til frásøgn og upplestur. Næmingarnir eru tó á einum máli um, at tað hevur stóran týdning fyri tey at lurta eftir lælaranum, tá hann fortelur ella lesur upp. Tey elska tað, siga fleiri teirra.

Eisini kemur til sjóndar, at eitt skifti fer fram áðrenn 6. flokk, tí fleiri næmingar nevna, at lærarin *fyrr* las og fortaldi fyri teimum. Tað vil siga, at í yngru flokkunum var javnan fortalt og lisið upp fyri teimum.

### Lesiátøk – í skúlatíðini

Kanningin vísir, at serlig lesiátøk eru í nógvum skúlum kring landið. Í fleiri skúlum er talan um lesiløtur, ið vara í eina viku. Hesa vikuna verður lisið í minsta lagi í 20 minuttir um morgunin, men næmingarnir nevna eisini, at teir lesa ein tíma ella tveir teir fyrstu tímarnar á morgni.

Tá ið átøk eru, krevja fleiri skúlar, at næmingarnir skulu lesa á føroyskum. Viðhvørt verður lisið um eitt ávíst felags evni í øllum skúlanum. Ofta skulu næmingarnir loysa uppgávur til bøkurnar, sum teir sjálvir sleppa at velja sær um ávísa evnið.

Aðrir skúlar loyva næmingum at lesa tað, sum tey hava hug til, og tey sleppa at sita har, ið tey hava hug at sita.

Dømi eru eisini um, at skúlar hava lesiløtur longri tíðarskeið t.d. ígjøgnum allan veturin.

Næmingunum dámar at sita og lesa, og teimum dámar, at friður er uttan um tey.

Næmingar siga:

*„Mær dámar so væl at sita og lesa fyrst á morgni, og at friður er uttan um meg.“*

*„Lesi minni í skúlanum enn heima. Missi illa vekk í skúlanum, tí tað larmar.“*

*„Nei, vit hava ikki lesiløtur.“*
*„Hava onkuntíð havt tað. Minnist ikki, hvussu tað var.“*

*„Lesivikur eina ferð um árið. Lesa 1. tíma hvønn dag.“*

*„Nakrar dagar eina ferð um árið lesur allur skúlin tveir teir fyrstu tímarnar.“*

*„Vit høvdu lesiátøk í fjør eina viku. Valdu sjálv bøkur og gjørdu uppgávur til bókina.“*

*(sitat úr samrøðum)*

Næmingar nevna, at teir halda hesi átøkini vera keðilig, tí tey eru óskipað, og ov nógvur larmur er uttan um tey. Tey klára tí ikki at hugsavna seg um lesingina í skúlanum; tey siga seg missa illa vekk, tá tey sita og lesa, og at tey lesa minni sum heild í skúlanum vegna larm. Fleiri børn kæra seg um larm.

Tey, ið keða seg, tá ið átøkini eru, siga eisini, at bøkurnar eru keðiligar.

Fleiri gera vart við, at tað var mest fyrr – í yngru flokkunum – at lesiátøk vóru. Tá varð nógv gjørt burtur úr lesingini, men nú tey eru í 6. flokki, er meiri tilvildarligt, hvat gjørt verður burturúr.

Nevnt verður eisini, at tey kappast um, hvør klárar at lesa flestar bøkur.

Summir skúlar gera eingi felags átøk yvirhøvur. Tey siga seg ongantíð hava havt lesiløtur ella tílíkt; á hesum somu skúlum siga næmingarnir, at eingin í skúlanum minnir tey á at lesa.

### Samanumtak

Samanumtikið vísir kanningin, at lesingin er sera ymisk í ymsu skúlunum og í ymsu flokkunum.

Í summum flokkum fáa næmingar nógva lesivenjing ígjøgnum skúladagin; teir hoyra søgur, ella tað verður lisið fyri teimum javnt og samt. Í øðrum flokkum verður minni lisið, og einki verður fortalt ella lisið upp fyri flokkinum.

Í nógvum flokkum lesa lærarar skúlatingini upp fyri næmingunum, áðrenn teir fara heim. Fleiri næmingum dámar tað væl, at lisið verður upp fyri teimum, tí teir fáa meiri við, tá ið teir hoyra tekstin, enn tá ið teir lesa innantanna. Onnur siga, at tað, at lærarin lesur skúlatingini upp, ger, at teir tíma ikki at lesa teir heima, tí teir minnast tað, sum varð lisið upp.

Vert er eisini her at geva gætur, at aðrir lærarar ikki lesa fakligan tekst upp í flokkum; tey fáa fyri at lesa hann heima.

Her sæst aftur stórur munur á, hvat hvør lærari ger inni í flokkunum, og hvørjar avbjóðingar næmingarnir fáa.

Sama sæst í lesiátøkunum. Ymiskt er, hvussu tey verða skipað, og hvussu nógv tíð verður brúkt til átøkini. Tað er týðiligt, at næmingarnir fegnast um at sleppa at sita og lesa fyrst á morgni, um átakið er

væl skipað, og friður valdar. Hinvegin troyttast tey og keða seg, tá lesiátakið er óskipað, og ófriður er uttan um tey, tí tey fáa ikki hugsavnað seg um at lesa.

Eitt annað fyribrigdi, ið næmingarnir nevna, er, at tey ikki hava fríar teymar at lesa, sum tey vilja. Tey skulu lesa um ávís evni, og tey skulu loysa uppgávur í sambandi við lesingina, eins og tey skulu uppihalda sær á ávísum staði, meðan lisið verður. Onnur hava púra frítt at fara og kunnu lesa tað, teimum lystir, og tey skulu ikki loysa uppgávur.

Eingin nevnir, at tey samrøða um bøkurnar, sum tey lesa, men at tey skriva ummæli ofta eftir einum frymli.

Sama er í kunningarfakunum; fleiri nevna, at tey loysa nógvar uppgávur í tímunum. Eingin nevnir, at tey samrøða um tað, ið tey hava fyri.

Stóri munurin á undirvísingini í skúlum og flokkum sæst í kvantitativu lesivanakanningini. Har sæst, at talan var um nakrar flokkar, sum lógu í botni viðvíkjandi hugburði til lesing, og hvussu ofta tey lósu, eisini nevnt topp 10-flokkar og botn 10-flokkar.

Mest verður lisið upp av fakligum tilfari; minni verður lisið upp ella fortalt av skaldskapi, har ið næmingurin kann liva seg inn í hendingar og frásøgn. Lítið verður fortalt uttan skrivliga keldu. Sambært næmingunum, so gevast lærarar at lesa upp og fortelja fyri børnum, áðrenn tey koma í 6. flokk.

Fleiri næmingar siga, at teir lósu meiri og oftari upp, tá tey vóru yngri. Sama siga næmingar um lesiátøk í summum skúlum; tað høvdu tey, tá tey vóru yngri, men ikki longur.



# Lesingin uttan fyri skúlan – í frítíðini

## Lesingin heima

**Viðkomandi fyri lesiførleikan** hjá næmingunum er spurningurin, um tey lesa heima, hvussu nógv tey lesa, og hvussu ofta tey lesa.

Greiningin av kanningini vísir, at tað er sera ójavnt, hvønn leiklut lesingin heima hevur í gerandisdegnum hjá teimum 12 ára gomlu børnunum.

Næmingar siga:

*„Eg havi eitt serligt stað, sum eg havi gjørt hugnaligt. Har seti eg meg at lesa, tá eg komi heim seinnapartin. Tá hvíli eg meg!“*

*„Eg lesi í skúlanum og heima. Eg lesi ikki so nógv heima. Eina ferð um vikuna, okkurt sovorðið.“*

*„Lesi ikki ofta heima; tað er ringt at lesa. Keðiligt at lesa. Hví? Óinteressant. Man noyðist at lesa keðiligar bøkur.“*

*„Eg lesi, tá eg fari í song. Lesi hálvan tíma, tá eg lesi.“*

*„Eg lesi ikki so nógv heima. Kanska eina ferð um mánaðin. Fái meiri við heima enn í skúlanum. Larmar so illa í skúlanum.“*

*„Eg lesi nokk so ofta heima. Hálvan tíma fleiri ferðir um vikuna. Eg lesi av hugi, eingin minnir meg á tað.“*

*„Eg lesi ongantíð heima, bara tá eg fái boð um at lesa.“*

*„Eingin sigur, eg skal lesa.“*

*„Vanligar dagar lesi eg um kvøldið. Onkuntíð í vikuskifti eisini, um bókin er ordiliga góð. Eg tími tað ordiliga væl.“*

*„Eg lesi eitt sindur heima hvønn dag. Í dagligdegnum meiri enn 20 minuttir, í vikuskiftinum 5-10 minuttir.“*

*„Eg lesi, tá eg fari í song. Tá fokuseri eg upp á okkurt og vil gjarna slappa av, og tá er telefonin sløkt.“*

*(sitat úr samrøðum)*

Í greiningini kom fram, at tað er stór spjaðing í, hvussu nógv børn í 6. flokki lesa heima. Summi lesa ongantíð heima, og onnur lesa nærum hvønn dag; eisini í vikuskiftinum. Og so eru tað tey, sum lesa av og á.

Tað, sum ávirkar lesitíttleikan heima sambært børnunum, er, um tey kenna tað tungt at lesa. Er tað ringt at lesa, er hugurin at lesa ikki til staðar. Tá halda tey, at tað er keðiligt at lesa, og at bøkur eru keðiligar.

Um børnini fáa boð um at lesa heima, so lesa tey heima, siga tey; men fleiri siga, at eingin minnir tey á at lesa heima, og tí verður einki lisið heima.

Tað eru eisini børn, sum siga, at eingin noyðist at minna tey á at lesa, tí tey lesa av hugi. Tey kobla úr og slappa av, tá tey lesa. Tey lesa, t.d. í einum steðgi í gerandisdegnum, tá tey koma heim úr onkrum samanhangi, og til tey skulu avstað aftur. So hvíla tey seg og kobla úr við eini bók. Fleiri nevna, at tey eru troytt í eygunum av telefonskíggjanum.

Tað hendir seg meir enn so, at børn sita heima saman við foreldrum ella systkjum og lesa. Foreldur lesa nógv á netinum, siga børnini, men sjálv samskifta tey og spæla har. Felags fyri øll tey, sum lesa, er, at tey lesa í seingini, áðrenn tey leggja seg at sova um kvøldarnar.

Tað sæst í kvantitativu lesivanakanningini, at 6. flokkur er eitt umskifti millum tað, sum var, og so tað, sum fer at verða. Næmingarnir lósu mest í 4. flokki, og teir lósu minst í 9. flokki.

Skiftið sæst týðiliga í hagtølunum og hendir um 6. flokk, tá fyrsta fallið kemur til sjóndar. Tá fær enskt størri ávirkan á teirra orðfeingi; ivaleyst tí, at nú fer talgildi heimurin at fylla meiri í degnum.



# Lesikveikjarar

## Vaksin sum lesikveikjarar

**Í kanningini er spurt um**, hvørjir persónar hava ávirkan á, um børnini lesa. Úrslitini vísa, at serliga mammur og lærarar hava stóran týdning sum lesikveikjarar hjá børnunum.

Næmingar siga:

*„Lærarar siga, at eg skal lesa.“*

*„Nei, lærarin sigur ikki, at vit skulu lesa heima longur. Eingin sigur, at tú skalt lesa.“*

*„Foreldini siga, at eg burdi lisið.“*

*„Mamma minnir meg á at lesa, tá tað er langt síðan síðst.“*

*„Hvat kann fáa teg at lesa meir? Um mamma tvingaði meg til tað!“*

*„Eingin sigur við meg, at tað er gott at lesa.“*

*„Lærarin í føroyskum minnir meg á at lesa heima onkuntíð. Mamman minnir meg eisini á at lesa onkuntíð.“*

*„Pápi sigur onkuntíð, at eg skal lesa.“*

*„Eingin sigur, at eg skal lesa.“*

*„Ja, lærarin í føroyskur sigur, at vit skulu lesa.“*

*„Mamma noyðir meg. Tími ikki at lesa. Lærarin minnir meg eisini á at lesa.“*

*„Mamma krevur, at eg lesi fleiri ferðir, tað ger babba ikki.“*

*„Lærarin í føroyskum minnir øll á at lesa heima.“*

*„Vissi eg ikki havi lisið eina viku heima, so biður mamma meg lesa.“*

*(sitat úr samrøðum)*

Nógvir lærarar minna næmingarnar javnt og samt á at lesa hvønn dag heima. Tey fáa bøkur heim við, og tey fáa at vita, at tey skulu lesa so og so ofta og so og so leingi. Serstakliga eru tað føroysklærarar, ið kenna ábyrgd og átaka sær leiklutin at minna næmingar á at lesa heima.

Næmingar nevna ikki aðrar faklærarar, ið minna tey á at lesa heima, men stundum umrøða tey lærarar í fleirtali, og tað gevur ábendingar um, at hóast tað einamest eru føroysklærarar, ið minna tey á heimalesingina, so gera aðrir lærarar tað eisini.

Heima er tað serstakliga mamman, ið heldur eyga við, um skúlabarnið lesur heima og eggjar tí at lesa. Varnast mamman, at hon ikki hevur sæð barnið lisið nýliga, so minnir hon á lesingina, siga fleiri.

Summi børn nevna, at mamman noyðir tey at lesa; og onkur nevnir, at hevði mamman tvingað seg at lisið, so hevði viðkomandi eisini gjørt tað.

Mamman er sum so tann, ið syrgir fyri, at tilmælini frá lærarum um at lesa heima, verða sett í verk. Pápin verður eisini nevndur sum ein, ið eggjar barninum, tó verður hann ikki líka ofta nevndur sum mamman. Onkur av børnunum nevna eisini abban.

Tað eru tó eisini tey, sum eingin minnir á at lesa. Hesi børnini fella í tveir bólkar, ið mynda ytstu mørkini í lesitíttleikanum.

Í øðrum bólkinum eru tey børnini, ið lesa av egnum hugi, og sum eingin tørvar at minna á at lesa. Tey lesa dagliga.

Í hinum bólkinum eru tey børnini, sum siga, at eingin minnir tey á at lesa, og at tey ongantíð lesa heima. Eingin kveikir tey ella tekur ábyrgd av, um tey lesa heima.

Sum skilst, so eru tað lærarar og mammur, ið hava størstu ávirkanina á lesingina hjá skúlabarninum. Har, sum lærarin ikki røkkur, tekur serliga mamman, tó pápar eisini verða nevndir, yvir og minnir á lesingina.

Hetta er í samsvari við tað, ið kvantitativa lesivanakanningin vísti, at tað serliga eru lærarar og mammur, sum hava størsta týdningin fyri lesivanarnar hjá børnum.

## Vinir og floksfelagar sum lesikveikjarar

Vinir og floksfelagar hava ikki sama týdning sum lesikveikjarar, sum tey vaksnu hava. Nøkur børn nevna vinir, ið fortelja um onkra bók, ið hann ella hon heldur vera serliga góða, og so fáa tey sjálv hug at læna somu bók.

Floksfelagaðar verða ikki nevndir í sama mun sum vinir.

Næmingarnir siga:

> *„Ein vinkona fortelur um tað, og so fái eg sjálv hug at lesa ta bókina."*
>
> *„Hini í flokkinum kunnu onkuntíð viðmæla eina góða bók."*
>
> *„Eg og ein vinkona hava lænt somu bók, so vit kunnu tosa um hana."*
>
> *„Vit viðmæla øðrum tær bøkur, sum vit halda eru góðar."*
>
> *(sitat úr samrøðum)*

Heldur ein næmingur, ið hevur høga tign í einum flokki, at ein ávís bók er serliga áhugaverd, so smittar tað á hini í flokkinum, og øll vilja hava fatur í somu bók.

## Tosa lítið um lesing

Greiningin av kanningini vísir, hvussu lesing verður umrødd í sambondum ímillum børn, eitt nú í vinaløgum og ímillum næmingar. Úrslitini vísa, at børn tosa ikki tað nógva sínámillum um tað at lesa. Tað sampakkar eisini við tað, at tey ikki eru týðandi lesikveikjarar fyri onnur børn (sí brotið *Vinir og floksfelagar sum lesikveikjarar*).

Næmingar siga:

> *„Man plagar ikki at tosa um tað at lesa!"*
>
> *„Man sigur ikki við onnur, at man lesur, tá man fer í song. Tað sigur man bara ikki."*
>
> *„Vinirnir lesa ikki, haldi eg, men eg veit ikki."*
>
> *„Mínir vinir lesa onkuntíð, men eg veit einki um hini."*
>
> *„Ja, mínir vinir lesa, men vit tosa ikki ofta um tað."*
>
> *„Lesa tínir vinir? Ja, nei, eg veit ikki."*
>
> *„Snakka tit um tað at lesa? Nei, ikki ordiliga."*
>
> *„Um tit høvdu snakkað meiri um bøkur í flokkinum, kanska millum vinir, hevði tú so lisið meiri? Ja, tað rokni eg við."*
>
> *„Lesa, men tosa ikki um tað."*
>
> *(sitat úr samrøðum)*

Sambært útsagnunum hjá børnunum, so er lesingin at kalla privat, og lesiupplivingin verður ikki deild við floksfelagar ella vinfók í serliga stóran mun. Lesingin verður ikki roknað sum eitthvørt annað frítíðarítriv, sum fyllir nógv í dagligdegnum hjá næmingum. Tey tosa ikki við ein og hvønn um tað at lesa. Hava tey onkran serliga góðan vin, so tosa tey onkuntíð um onkra bók. Tað kann eisini henda, at summi velja at læna somu bók, sum tey so kunnu lesa í felag og tosa um.

Øll vita um onkran, sum lesur serliga nógv í flokkinum; men meginparturin av næmingunum vita ikki, um floksfelagar ella vinfólk lesa regluliga ella ikki. Tað tosar man ikki um, sum tey málbera seg. Tey kjakast heldur ikki sínámillum um bøkurnar, sum tey hava lisið.

# Hugburður til lesarar og tað at lesa

**Í kanningini verða næmingarnir** spurdir, hvat teir halda um tað at lesa, eins og hvat teir halda um tey, ið tíma at lesa.

Teirra hugburður kemur fram í greiningini undir hesum heitinum.

Kanningarúrslitini vísa, at óansæð um næmingarnir lesa ella ikki tíma at lesa, so hava tey jaligan hugburð til tey, sum lesa.

Fleiri siga, at tað er nørdut at lesa, men at tað er jaligt at vera nørdur. Tey halda, at tað er umráðandi at lesa, tí tú verður klók/ur av at lesa.

Næmingar siga:

*„Eg tími at lesa, um tað er áhugavert. Sovorðið um verðina, 2. heimsbardaga, um steinøld og svartadeyða."*

*„Keðiligt at lesa, men veit, at tað er gott. Minni keðiligt, um eg fann eina bók, sum var spennandi."*

*„Eg eri ikki so klókur at lesa."*

*„Eg tími væl at lesa. Dámar væl at lesa fakta, krimi, spennandi bøkur og um kríggj."*

*„Tað er stuttligt og spennandi at lesa, tí tími eg at lesa."*

*„Tað er avslappandi at lesa."*

*„Eg lesi, tí so læri eg føroyskt mál og alt møguligt; tað er stuttligt."*

*„Man skal bara lesa. Tað er fínt. Tey, sum lesa eru fín … akkurát sum eg."*

*„Hugnaligt at lesa, og tað, at tú kanst ímynda tær myndirnar í høvdinum."*

*„Tað kann vera keðiligt at lesa, men um bókin er góð, er tað stuttligt."*

*„Eg fekk hug at lesa. Tí eg fann eina spennandi bók! Fann fleiri, og so bleiv tað til ein vani … tí tað var spennandi!"*

*„Tá eg keði meg og einki er at gera, so fari eg at lesa."*

*„Lesing keðir meg. Lesi kanska eina ferð um vikuna."*

*„Tað er gott at lesa, tí tað verður lættari at fáa eina útbúgving. Og um man lesur nógv, so lesur man skjótari. Akkurát sum í ítrótti."*

*„Man lærir nógv føroyskt av tí og lærir at stava. Lærir at skriva. Eg kanni orð, og hvat tey merkja."*

*„Keðiligt at lesa, vil heldur vera úti og røra meg. Flott, at onnur klára at lesa."*

*„Eg haldi, at tað er gott, at onkur tímir at lesa."*

*„Tað er viktigt at duga at lesa. Nøkur duga ikki."*

*„Kul at lesa, og tey, sum lesa, eru ordiliga kul."*

*„Eg skilji ikki tey, sum tíma at lesa nógv."*

*(sitat úr samrøðum)*

Fleiri børn nevna, at tað kann vera keðiligt at lesa, men at tað hjálpir, um tú finnur eina góða bók; so er tað stuttligt.

Tað vil siga, at hugurin at lesa er tongdur at, hvussu bókin er. Finna børnini røttu bókina; t.e. eina bók um eitt evni, ið hevur teirra áhuga, so dámar teimum at lesa.

Tey, sum tíma at lesa, finna góðar bøkur, sum fær tey at slappa av og at hugna sær. Hesi børnini nevna stundum, at tey hava eitt serligt stað, har ið tey lesa.

Fyri summi er tað bara keðiligt at lesa, og tey vilja heldur brúka tíðina til okkurt annað. Tey halda hóast tað, at tað er flott, at onnur tíma at lesa, og at tað er kul og fínt, at hini at lesa. Onkur sigur seg tó ikki skilja, at onnur tíma at lesa.

Fleiri nevna eisini, at lesingin er lærurík. Tú fært vitan, tú lærir nýggj orð, tú lærir at skriva og at stava, og tað verður lættari at fáa eina útbúgving.

Ein hevur tey góðu ráð, at man skal bara lesa; „… og um man lesur nógv, so lesur man skjótari. Akkurát sum í ítrótti." Tað snýr seg við øðrum orðum um at fáa ferð á lesingina, so verður ein og hvør kringari, og so er tað ikki keðiligt.

# Tilfar

**Hvat fyri bøkur lesa børnini**, tá ið tey sjálv sleppa at velja? Hvat tekstaslag og um hvørji evni? Í fyrru kanningini frá 2017-2018 siga ikki minni enn tveir triðingar, at tey høvdu lisið meiri, um fleiri bøkur vóru um evni, sum hava teirra áhuga. Og annar hvør næmingur sigur, at um tey vistu onkra góða bók, so høvdu tey lisið meiri.

Útsagninar í talvuni niðanfyri kunnu benda á, at útboðið av bókum ikki er nóg stórt, ella at tað ikki eru nóg nógvar bøkur um evni, børnini tíma at lesa um.

Umleið 60 bøkur koma út á hvørjum ári til børn í skúlaaldri, tað vil siga, at seinastu fimm árini eru í øllum førum 300 bøkur komnar út á føroyskum til børn í skúlaaldri at lesa sjálv ella til vaksin at lesa fyri børnum. Fleiri av hesum bókunum hava vakt ans uttanlands, antin tí tær hava fingið virðisløn, eru metseljarar ella av fakfólki og lesarum verða mettar at verða dygdargóðar bøkur. Tað er tí upplagt at seta spurningin, um kunningin av nýggjum bókum er nóg góð og munadygg, og tá hugsa vit bæði kunningin, sum forlagið hevur, tá ið bøkurnar koma út, og kunningin, sum tey, ið skulu kunna børn og ung um bøkur andlit til andlits, tað vil siga foreldur, lærarar og bókavørðir.

Fyri at koma nærri inn á henda spurningin hava vit í kvalitativu kanningini spurt, hvar tey lesa (*tað er í bókum, bløðum, á portalum, á telefonini, telduni, teldli*), hvat tey lesa, (*tað er tekstaslag*), hvat tey tíma at lesa um, hvat ein góð bók er, hvat tað er, sum ger, at tey fáa hug at lesa, á hvørjum máli tey lesa, og hvørjum miðlum tey reika á.

**21. EG HEVÐI LISIÐ MEIRI...?**




## Á pappíri ella skíggja?

Stutta svarið til spurningin um børn stytta sær stundir við at lesa eina søgu ella bók á teldu, teldli ella telefon, er: nei! Tað gera tey ikki. Børn skilja greitt ímillum pallarnar – pappírsbókina og netmiðlar. Tey eru á netmiðlum, tá ið tey vilja lesa tíðindi og kunna seg við eitthvørt evni, og tá skal teksturin vera stuttur ella skjótur at lesa. Tey kunnu finna uppá at leita eftir meiri vitan á netinum um eitt evni, ið tey lesa um í eini bók – tað vil siga gugla sær meiri vitan um okkurt ávíst.

*„Tá eg lesi á telefonini, lesi eg nógv, men tað er ikki bøkur. Um okkurt, tíðindi og sovorðið.“*

*(brot úr samrøðu)*

Tá ið tey lesa søgur og bøkur, tað vil siga samanhangandi tekst, sum krevur hugsavnan og dýping, so er tað heilt greitt framvegis pappírsbókin, sum er ráðandi og sum børnini taka fram um.

Børnini siga:

*„Eg lesi mest í bókum, tí mær dámar at halda í bókini.“*

*(brot úr samrøðu)*

Fleiri siga, at teimum ikki dámar at lesa á telefon ella teldu, at ljósið frá telefonini ella telduni órógvar og møðir tey, og at tey hava ilt við at finna nakað, sum tey tíma at lesa, á netinum.

*„Dámar ikki at lesa í telefon ella í teldu. Móður av at lesa í telduni.“*

*„Tí skermurin lýsir so bjart, hann lýsir beint í eyguni, so verður man so troyttur beinanvegin.“*

**25. TÁ IÐ TÚ LESUR, HVUSSU DÁMAR TÆR SO BEST AT LESA?**




*„Eg lesi bara pappír. Eg lurti heldur ikki eftir ljóðbókum.“*

*(brot úr samrøðum)*

Í fyrru lesivanakanningini síggja vit, at tveir triðingar av børnunum siga seg dáma nógv best at lesa á pappíri, og 14 % svara telefonin sum besti miðilin.

Tølini úr kvantitativu lesivanakanningini og útsagnirnar hjá næmingunum í kvalitativu lesivanakanningini lata ongan iva vera um, at næmingar gera greiðan skilnað millum pappírsbókina og lesing á telefon og teldli ella teldu. Teimum dámar pappírsbókina, tá ið tey lesa og skulu savna seg um eina søgu; telefonina, teldilin og telduna brúka tey til annað. Tá ið talan er um henda spurningin, pappírsbókin ella at lesa bók á teldli ella telefon, so mugu vit eisini hava í huga, at útboðið av e-bókum á føroyskum enn er sera lítið, og tá ið kanningin staðfestir, at børn helst vilja lesa á føroyskum, so hevur hetta eisini týdning.

## Hvat lesa tey?

Børn í sætta flokki lesa bæði fiktión og fakta. Somu næmingar kunnu nevna bæði fantasi og realistiskar bøkur. Summum dámar betur annað fram um hitt; dreingir nevna tó oftari fakta enn gentur.

Í samrøðunum royndu vit at fáa børnini at nevna bøkurnar, tey hava lisið nýliga ella seinast. Samanumtikið geva svarini, vit fingu, okkum eina mynd av, at nógvar av bókunum, tey nevna, eru bøkur, sum eru komnar út fyri rúmari tíð síðan.

*„Eg lesi helst fakta. Eg lurti ikki eftir ljóðbókum. Eg lesi mest í bókum.“*

*„Bøkur av bókasavninum, sum onkur hevur funnið uppá, langar søgur, krimi.“*

*(brot úr samrøðum)*

Halda vit tað upp ímóti hvørjum øðrum, at nógvar av bókunum, tey nevna, eru eldri bøkur, og at tey samstundis sakna bøkur um evni, tey tíma at lesa um, so hongur tað ikki heilt saman. Hugsa vit um útsøgnina hjá einum barni, sum sigur:

*„Fyrr var tað ringt at finna nakra bók, men nú havi eg lisið so nógvar, at nú haldi eg, at allar eru spennandi!"* so gevur hetta ábendingar um, at tað snýr seg um at miðla bøkur og vísa børnunum á allar tær bøkurnar, sum eru til á føroyskum.

## Hvat tíma tey at lesa?

Børn og ung í Føroyum eru sum børn og ung kring allan heim; tey tíma væl at lesa um onnur børn og ung, um viðurskifti millum fólk í familjum, um skilnað, um vinarbond og um kærleika. Hetta eru alt sambond og viðurskifti, ið hava stóra ávirkan á teirra egna gerandisdag, og sum kann geva teimum innlit í, hvussu onnur klára at loysa trupulleikar og avbjóðingar í nærsambondum.

> ***„Eg lesi meiri um stórar planetir, okkurt hemmiligt, rúmdarstøðir, hvussu tær eru bygdar og sovorðið. Rúmdardraktir viga nógv. Eg vil helst lesa um tað, sum passar."***
>
> *(brot úr samrøðu)*

At nógv um 12 ára aldur siga, at tey helst vilja lesa spennandi og stuttligar søgur, kemur neyvan óvart á nakran okkara. Summi vilja lesa spenningssøgur ella krimi; onnur siga tey vilja lesa spennandi bøkur, men ikki bøkur um trupulleikar. Meðan kærleiki og forelskilsi er evni, summi tíma væl at lesa um, eru tað kanska líka nógv, sum ikki tíma.

Tá ið talan er um faktabøkur, so eru tey rættiliga ítøkilig, tá ið vit spyrja, hvat tey tíma at lesa um. Tey siga til dømis rúmdina, Føroya søgu, Norske Løve, annan heimsbardaga og kríggj yvirhøvur, steinøldina og svartadeyða. Sum heild eru søgulig evni frammarlaga. Eisini fótbólt eru tað fleiri, sum siga seg tíma væl at lesa um – og onnur, sum siga seg als ikki at tíma at lesa um. Rættiliga nógv siga, at tey tíma betur at lesa faktabøkur enn fiktión; tað eru serliga dreingir, sum siga tað.

Tjúkkar bøkur ella tunnar bøkur; tað hava børnini eisini eina meining um. Ein tjúkk bók kann ræða summi, og tey velja tær konsekvent frá, líka mikið hvussu spennandi tær kunnu virka at vera, meðan onnur siga, at tey vilja lesa tjúkkar bøkur. At megna at lesa tjúkkar bøkur er eisini eitt, sum vekir ans, tí børnini kunnu vísa á vinir ella floksfelagar, at „tey lesa tjúkkar bøkur". Hetta eru ofta tey, sum sjálv ikki lesa tjúkkar bøkur. Stutt sagt: summi velja eftir tjykdini á bókini, men tað gera øll ikki.

> ***„Eg dámi væl, um tær eru tjúkkar; eg vil gjarna hava eina góða, tjúkka bók."***
>
> *(brot úr samrøðu)*

Bókin fram um aðrar, sum børnini nevna, er *Harry Potter*. Tá ið tann fyrsta í røðini kom út í 1997, fóru børn kring allan heimin at lesa um gandakallin í Hogwarts og vinir hansara. Børn og ung lósu hesar tjúkku bøkurnar, hóast tey ikki vóru nóg stinn at lesa, og hóast tey skuldu stríða seg ígjøgnum tekstin. Í onkrum føri gekk eitt sindur av tíð, til bókin kom í føroyskari týðing. Tí lósu tey, sum ikki høvdu tol at bíða, bøkurnar á enskum. Nógv – bæði gentur og dreingir – hava lisið allar bøkurnar fleiri ferðir. Hevur tú lisið allar sjey bøkurnar um Harry Potter, so hevur tú lisið meiri enn eina millión orð. Og stríðið lønar seg, tí tey fáa ein lesiførleika og eina lesiferð, sum tú bara ognar tær, um tú lesur ein hóp av bókum. Tað áhugaverda í hesum er, at bókin útloysir motivatiónina. Finnur tú røttu bókina, so er einki ófort, og tú mennir ein førleika, sum ger, at tú fært hug og førleika at lesa annað og meiri.

> ***„Lisið tvær Harry Potter. Harry Potter er góð, spennandi, nógvar hendingar."***
>
> ***„Eg las Harry Potter-bøkurnar fyrr: mamma plagdi at siga, at eg kundi verða longur upp, um eg las. Tað skal vera okkurt spennandi, um eg skal tíma."***
>
> *(brot úr samrøðum)*

So kunnu vit spyrja, um tað framvegis er soleiðis – eina fjórðingsøld eftir, at tann fyrsta bókin um Harry Potter kom út – at børn og ung í Føroyum lesa Harry Potter. Svarið er bæði ja og nei. Harry Potter livir onkursvegna framvegis í hugaheiminum hjá børnum í dag; tey vita um onnur, sum hava lisið bøkurnar og halda, at tey eru ófør, men nógv hava ikki áræði at fara í holt við hesar tjúkku bøkurnar.

> ***„Eg var í ferð við Harry Potter, men eg orkaði ikki, tí hon er 700 síður, men eg eigi hana heima."***
>
> ***„Tann eini vinmaðurin hjá mær lesur nógv. Hann lesur Harry Potter, eg haldi, at hann hevur lisið allar. Hann lesur eisini sovorðnar tjúkkar bøkur."***
>
> ***„Nei, eg kom til s. 19, so tímdi eg ikki meiri."***
>
> *(brot úr samrøðum)*

Tað er eingin ivi um, at Harry Potter í tilvitinum hjá nógvum børnum er ein serlig bók og ein bók, mestsum øll børn kenna, hóast tey ikki hava lisið røðina. Sum tað sæst á útsøgnunum hjá næmingunum, eru summi byrjað, hava lisið fyrstu bøkurnar í røðini og eru givin, og onkur er byrjaður upp á ta fyrstu og er givin, tí bókin er drúgv ella ring at koma ígjøgnum. Tað eru tó enn nøkur, sum lesa Harry Potter, men sambært samrøðunum ikki so nógv.

## Hvat er ein góð bók?

Hetta er ein spurningur, sum tað sjálvsagt eru nógv boð uppá. Onkur sigur, at ein bók ikki „skal vera ov kiksað"; tá ið vit spyrja, hvat liggur í tí, so siga tey, at hon ikki skal fortelja ov nógv um eitt ting – tað er ikki at fara ov nógv niður í smálutir. Og hon skal fanga, og helst alt fyri eitt.

> ***„Ein, sum er spennandi og eitt sindur av drama og um fólk, og hon kann vera óverulig knappliga."***
>
> ***„Skal vera spennandi, men ikki ov óhugnalig, um vinalag og slíkt."***
>
> ***„Sovorðið, sum fólk hava funnið uppá."***
>
> ***„Eg tími ikki at lesa um fótbóltsspælarar og sovorðið, djór og lond, mær dámar best at lesa søgur, sum onkur hevur funnið uppá. Kanska onkur spælir okkurt, kanska onkur verður óvinir, men so verða tey vinir aftur og sovorðið."***
>
> ***„Eg tími ikki bøkur, sum forklára so nógv um eitt spesielt ting, men bara forklárar okkurt eitt sindur og fer víðari."***
>
> ***„Tá okkurt er gott, so verður tað ringt, og so verður tað gott aftur. T.d. Eg sá ein eingil. Ein góð bók skal vera um sovorðið vanligt, gerandisdagin, ikki fantasi."***
>
> ***„Søgur sum onkur hevur funnið uppá, sovorðið ektað."***
>
> *(brot úr samrøðum)*

Børnini hava greiða fatan av, hvat tey tíma at lesa, og hvat tey ikki tíma at lesa, bæði tá ið talan er um evni og tekstaslag. Útsagnirnar kunnu benda á, at tey ikki hava tol at lesa bøkur, sum ikki svara neyvt til tað, tey vilja hava tær at vera.

## Hvussu velja tey?

Hetta er kanska tann mest áhugaverdi spurningurin yvirhøvur, tí kenna vit svarið, so vita vit, hvat vit kunnu gera fyri at fáa fleiri at lesa.

> ***„Eg hyggi fyrst at permuni og viti, um hon er stuttlig; so lesi eg aftanfyri, og virkar hon spennandi, so taki eg hana."***
>
> *(brot úr samrøðu)*

Nógv hava permuna sum barometur fyri, um bókin er verd at fara undir ella ikki. Lokkar perman ikki, verður bókin vald frá. Tað eru tó eisini tey, sum siga, at perman ikki sigur nakað um, um bókin er góð ella ikki.

*„Perman sigur ikki, hvussu bókin er.“*

*(brot úr samrøðu)*

Longdin á bókini hevur nógv at siga fyri summi. Felags fyri tey, sum dámar tjúkkar bøkur, er, at tey lesa nógv og ofta tjúkkar bøkur. Teksturin á baksíðuni hevur eisini nógv at siga; hann skal vera fangandi fyri at tey tíma. Og hevur bókin myndir, so skulu tær eisini vera fangandi.

*„Eg kann eisini lesa mega leingi, um tað er spennandi.“*

*„Nokk so lætt, eg lesi altíð permuna, aftanfyri. Onkuntíð blundi eg bara og taki eina bók. Eg blaði og viti um eg tími at lesa hana.“*

*„Vit hyggja at nógvum bókum, at permuni, um hon er spennandi ella ikki, og so lesa vit aftanfyri og vita um tað er tann bókin, vit vilja hava.“*

*(brot úr samrøðum)*

Um tað er perman, myndprýðingarnar, útsjóndin sum heild, tjykdin á bókini ella teksturin á bakpermuni, sum hevur størst týdning, tá ið næmingar velja sær eina bók at lesa, er ilt at siga. Av útsøgnunum at døma hevur perman ógvuliga nógv at siga fyri, um barnið velur at kanna bókina nærri og kanska lesa hana. Lærarar og foreldur siga ofta við børn, at tað er gott hugskot at lesa seg inn í bókina, lesa nakrar síður og ikki leggja hana frá sær ov skjótt, hóast hon kanska ikki fangar alt fyri eitt. Men sambært børnunum, vit hava tosað við, skal bókin vera spennandi alt fyri eitt, um tey skulu halda á at lesa.

## Á hvørjum máli lesa tey?

Seinna lesivanakanningin endurspeglar tað, sum kemur fram í fyrru kanningini, nevniliga, at flestu næmingum dámar best at lesa á føroyskum.

*„Mest føroyskum. Ikki so nógv á donskum, tí tað dámar mær ikki væl; eg lesi meiri á enskum enn donskum.“*

*„Nei, eg lesi næstan bara føroyskt.“*

*„Føroyskt. Á google lesi eg mest danskt.“*

*„Í skúlanum lesa vit eisini danskt og enskt, men mær dámar best at lesa á føroyskum.“*

*(brot úr samrøðum)*

Danskt er ikki útdeytt millum børn, summi lesa danskt, tí tey lesa Jumbo-bøkur og Anders And, og tí at tey eiga nógvar danskar bøkur ella hava atgongd til tær, men enskt hevur yvirhálað danskt á øðrum plássi, so sum nógv hevur bent á í nøkur ár.

*„Í skúlanum lesi eg bara føroyskt, men heima lesi eg nógv danskt, tí vit eiga ræðuliga nógvar danskar bøkur. Enskt lesi eg meiri á telefonini og telduni. Vit eiga ikki nógvar bøkur á enskum.“*

*(brot úr samrøðu)*

Var tað ikki fyri Anders And og Jumbo-bøkur, er spurningurin, hvussu nógv hevði verið lisið á donskum millum børn, tí tá ið vit spyrja, hvat tey lesa á donskum, eru tað hesar, tey flestu nevna. Hví hesar, spurdu vit; tí tær eru stuttligar, siga børnini.

Í fyrru kanningini síggja vit, at dreingir lesa minni enn gentur á føroyskum, men lesa meiri á enskum enn genturnar; sama er, tá ið talan er um onnur mál. Genturnar lesa meiri á donskum enn dreingirnir. Umframt kemur fram, at tey, sum siga seg lesa nógv í frítíðini, lesa meiri á føroyskum og á donskum, men tey, sum siga seg lesa lítið ella einki, lesa oftari á enskum, enn tey, sum lesa nógv.

**19. Á HVØRJUM MÁLI LESUR TÚ Í FRÍTÍÐINI?**




Hóast tað hevur verið nógv frammi seinastu tíðina, at enskt trokar føroyskt út, so er einki, ið bendir á, at næmingar heldur vilja lesa enskt fram um føroyskt. Mestsum allir næmingarnir, vit hava tosað við, vilja helst lesa føroyskt. Fyrra lesivanakanningin vísir, at tey, sum lesa nógv føroyskt, lesa eisini enskt, meðan tey, sum lesa lítið, lesa meiri enskt enn føroyskt.

## Hvørjar miðlar brúkar tey?

Sum talvan á næstu síðu (úr fyrru lesivanakanningini) vísir, so brúka børn miðlarnar nógv. Børnini hyggja nógv at filmum á Netflix, YouTube og øðrum; fleiri enn 90 % siga seg hyggja upp til ein tíma ella longur hvønn dag. Tað, sum vit ofta hava kallað vanligu miðlarnar, standa veikt; nógv siga seg ongantíð hvørki hyggja í sjónvarp ella lesa bløð og bøkur.

Tá ið tað kemur til talgild tól og nýtsluna av teimum, so siga 42 % seg brúka telefon, teldil ella teldu meiri enn 4 tímar um dagin; um tey, sum brúka hesi tól meiri enn ein tíma, verða tald við, so er talið 73 %.

Vit kunnu sostatt staðfesta, at nógv brúka miðlarnar nógv, men stórt sæð bara til at reika á, lesa okkurt smávegis, kunna seg við okkurt sum hendir, samskifta við onnur, spæla og so framvegis. Fyrra lesivanakanningin staðfestir, at bara 10 % siga seg lesa bloggar, greinar og annað á telduni í meiri enn ein tíma um dagin. 10 % lesa bøkur og bløð longri enn ein tíma um dagin. Tað, sum tey brúka miðlarnar til, er sostatt ikki til samanhangandi lesing av tekstum, men bara smærri brot. Og miðlarnir og pallarnir, tey brúka, eru miðlar, vit kenna, instagram, TikTok, YouTube, Facebook og so framvegis.

## 8. HVUSSU NÓGVA TÍÐ BRÚKAR TÚ TIL HETTA EIN VANLIGAN DAG?




Í kvalitativu lesivanakanningini sigar næmingarnir:

*„Eg lesi portalin, tí eg lesi tíðindi. Eg finni søgur fram á pinterest, geri screenshot og so lesi eg tað um kvøldið. Um eg lesi okkurt í eini bók, eina sjúku ella sovorðið, so google eg. Onkuntíð skilji eg ikki orðið í sprotanum.“*

*„Eg lesi eitt sindur á portalinum, eg eri ofta á YouTube, eg lesi eisini tekst har, undirtekst á donskum, um eg ikki skilji tað enska. Eg google ensk orð í staðin fyri sproti. Eg sproti eisini.“*

*„Eg lesi sum oftast portalin, eg havi ikki Facebook. Eg google onkuntíð okkurt, um eg vil vita meiri um okkurt. Onkuntíð sproti eg eisini. Ella spyrji mammu og babba.“*

*(brot úr samrøðum)*

Svarini upp á henda spurningin leggja seg upp at spurninginum, hvørt teimum dámar at lesa pappírsbók ella á telefonini, teldlinum ella telduni. Heimasíður og miðlar sum heild brúka nógv til at reika á, leita eftir ymiskum og lesa okkurt ávíst, og til undirhalds og samskifti við vinir og onnur eisini. Miðlarnir verða ikki brúktir til at lesa langar samanhangandi tekstir, eitt nú søgur.



# Skúlabókasavnið

### Frílesing og skúlabókasavnið – í skúlatíðini

Sambandið millum skúlabókasøvnini og næmingarnar ígjøgnum skúladagin verður eisini lýst og greinað í kanningini. Skúlabókasavnið, ið hýsir bókahópinum í skúlunum, er miðdepil fyri miðling og lán av bókum.

Kanningin fevnir um frílesing, atgongdina til bøkur og miðling av bókum.

Kanningin vísir, at tað er rættiliga ymiskt, hvussu frílesingin er skipað úti á skúlunum. Summir næmingar siga, at teir hava frílesing ein ávísan tíma á tímatalvuni ígjøgnum alt árið. Fleiri næmingar siga, at í teirra flokkum verður lisið í endanum av tímum, tá ið setningurin fyri tíman er liðugur. Tá lesa tey teir síðstu 15-20 minuttirnar av tímanum. Hetta verður gjørt regluliga aftur og aftur.

Øll tey, ið frílesa, nevna, at tað er í føroyskum, at tey frílesa. Summi hava eisini frílesing í donskum og enskum, men tað kemur ikki so ofta fyri.

Fleiri siga, at tey høvdu oftari frílesing í yngru flokkunum.

Næmingar siga:

*„Viðhvørt fara vit ofta á bókasavnið, men ikki alla tíðina, lærarin bestemmar, eina ferð um vikuna, ella eina ferð um mánaðin ella longri ímillum.“*

*„Vit hava bara frílesing í føroyskum ein dag um vikuna; fyrr eisini í donskum, men ikki longur.“*

*„Lesa í endanum í tímanum.“*

*„Lærarin fer ikki við á bókasavnið.“*

*„Fara við læraranum á bókasavnið, tá ið man er liðugur við bókina.“*

*„Fara onkuntíð á bókasavnið.“*

*„Ikki ofta á bókasavnið, kanska tvær ferðir um árið. Men tá vit eru har, eru vit har tveir skúlatímar.“*

*„Vit sleppa at læna bøkur 2 ferðir um vikuna, eg fari 3.-4 hvørja viku.“*

*(sitat úr samrøðum)*

Fleiri næmingar siga, at tey lesa nógv í skúlanum; lærarin stýrir tíðini og krevur, at næmingarnir skriva ummæli, tá ið bókin er liðug. Tey frílesa hvønn dag ella næstan hvønn dag í føroyskum.

Onnur siga, at tey lesa onkuntíð. Tá fara tey á bókasavnið eftir bók. Summi sita og lesa á bókasavninum; onnur siga, at tey fara í stovuna at lesa læntu bókina.

Tað eru tey, ið siga, at tað er ikki ofta, at tey frílesa; tey frílósu viðhvørt fyrr, og tað vil siga í yngru flokkunum. Á fleiri skúlum eru yngru flokkarnir oftari á bókasavninum, tí teir frílesa meiri enn teir í miðdeild.

Næmingar siga:

*„Tað eru mest tey yngru børnini, sum fara á bókasavnið.“*

*„Nei, frílesa ikki so ofta. Meira fyrr.“*

*„Tað er mest innskúlingin, sum fer á bókasavnið.“*

*„Vit hava bara frílesing í føroyskum ein dag um vikuna, fyrr í donskum, men ikki longur.“*

*(sitat úr samrøðum)*

Tað eru eisini tey, sum siga, at tey frílesa als ikki í skúlanum, men tey fáa boð um at frílesa heima. Tey skulu frílesa heima hvønn dag; men tey gloyma tað ofta. Eingin kannar, um tey hava frílisið heima, siga tey.

Tað er, sum skilst, sera misjavnt, hvussu frílesing verður fyriskipað, og stórt spenni er ímillum ymsu skúlarnar, hvussu ofta og hvussu títt lisið verður.

Spennið er frá sera ofta og dagliga til ongantíð.

Tað eru skúlar, har eingin frílesing er. Hóast tey ganga í 6. flokki, siga tey, at flokkurin ongantíð hevur ella hevur havt frílesing.

Í fleiri skúlum er bókasavnið læst ávísar tímar í skúlatíðini, og avtalast skal, nær man kann fara har.

Nógv fara á bókasavnið saman við lærarunum, tá ið tørvur var á tí; onnur hava fasta tíð, tá ið skúlabókavørðurin er har.

Samanumtikið kann sigast, at kanningin vísir, at tað er ymiskt, hvussu ofta og hvussu leingi næmingar frílesa í skúlanum ella heima eftir boðum.

Sostatt er eisini sera ymiskt, hvussu nógva lesivenjing næmingar fáa í skúladegnum.

Hetta speglast eisini aftur í kvantitativu lesivanakanningini sambært botn 10- og topp-flokkum (sí kvantitativu kanningina).

## Skúlabókasavnið og miðling

Kanningin staðfestir, at nógvir næmingar hvørki spyrja lærara ella bókavørð um hjálp at finna eina góða bók, hóast tey sjálv ikki megna at finna hana.

Næmingar siga:

*„Tá tú ongar bøkur kennir, so er tað so ringt at velja.“*

*„Eingin hjálpir mær at finna bók. Eg lesi úr onkrari bók fyri at vita, um hon er ov ring.“*

*„Bókavørðurin kemur við onkrari bók, men eg velji eina aðra. Spyr ikki, hvat eg tími at lesa um. Ofta er bókin ov ring …“*

*„Lærarin kemur við góðum bókum.“*

*„Eg vil ikki hava hjálp, tí so fái eg ov ringar ella keðiligar bøkur.“*

*„Fyrr var tað so ringt at finna nakra bók, men nú havi eg lisið so nógvar, og nú haldi eg, at allar eru spennandi! Tað verður lættari at finna eina góða bók, jú fleiri bøkur tú hevur lisið.“*

*„Vit hava fingið undirvísing í bókasavnskunning“*

*„Nokk so ringt at finna eina góða bók. Perman sigur ikki, hvussu bókin er.“*

*„Prøvi meg bara fram, tá ið eg leiti. Hyggi at permuni og myndunum.“*

*„Ordiliga ringt at finna eina bók at lesa. Spyrji ongan um hjálp.“*

*„Eg finni sjálvur bøkur. Lesi á permuni og inni í bókini fyri at meta um hana.“*

*„Lærarin hjálpir at finna bøkur á bókasavninum.“*

*„Um tað var lættari at finna eina góða bók, so hevði eg lisið meiri.“*

*„Lærarin hjálpir, onkuntíð bókavørður, man fær bøkur, sum man ikki tímir at lesa. Teir duga ikki at finna ta røttu bókina til mín.“*

*„Vit hava lært at leita eftir bókum sjálv.“*

*„Oftast spyrji eg læraran, tí hann veit eitt sindur, hvørjar bøkur eg vil hava.“*

*„Vit fara ikki sjálv á bókasavnið. Ordiliga ringt at finna eina bók at lesa. Spyrji ongan um hjálp.“*

*(sitat úr samrøðum)*

Fleiri siga, at tey tíma ikki at lesa, tí bøkurnar eru keðiligar. Tey duga ikki at finna góðar bøkur. Tað hjálpir ikki, at spyrja tey vaksnu, tí so fáa tey ofta eina tilvildarliga bók, sum er ov torfør, og sum tey ikki hava áhuga í, siga tey.

Tá tey sjálv leita, meta tey seg ofta eftir, hvussu perman sær út, tí hon kann geva ábending um, um bókin er áhugaverd. Men tað heldur ikki altíð. Perman snýtir tey ofta.

Tá ið tey ongar bøkur kenna, so er tað so ringt at velja eina bók, og sum oftast enda tey við eini keðiligari bók.

Hevur tú lisið nakrar bøkur, so verður lættari at finna góðar bøkur, siga fleiri.

Tað eru eisini tey, sum siga, at lærarin í føroyskum kemur við góðum bókum til tey. Lærarin veit ofta, hvat tey tíma at lesa. Aðrir næmingar gera vart við, at teirra lærari ikki kemur inn á bókasavnið við teimum.

Nevnt verður eisini, at næmingar hava fingið undirvísing í bókasavnskunning, og at tey tískil megna at leita í bókahópinum eftir ávísum evnum og ávísum bókum. Tey siga, at tey duga at leita eftir bókum um evni, sum tey hava áhuga fyri. Tað hjálpir teimum at finna røttu bókina sjálv. Tey hava lært at leita og brúka Google og heimasíður.

Hesin trupulleikin at finna ta góðu bókina, sást eisini í kvantitativu kanningini.

# Samanumtak

Í kvalitativu kanningini hava vit tosað við 38 børn í 19 flokkum í 10 skúlum, sum eru ymiskir í støðd og kring alt landið.

Vit hava havt samrøður við tey um lesing í skúlatíðini, so sum lesing inni í flokkinum og lesiátøk.

Eisini tosaðu vit við tey um lesingina heima, um hvør kveikir tey at lesa, um tey tosa við onnur um lesing, og hvønn hugburð tey hava til lesing.

Tosað var eisini um skúlabókasavnið og frílesingina, um miðling av tilfari og hvør hjálpir teimum at finna røttu bókina.

Harumframt hava vit tosað við tey um, hvat tey tíma at lesa, og hvat tey halda um útboðið á bókum, á hvørjum máli tey lesa, og hvussu tey brúka miðlar, t.d. pappírsbók og talgildar miðlar.

Kvalitativa lesivanakanningin 2020-2022 tekur støði í úrslitunum av kvantitativu lesivanakanningini 2017-2018; tað vil við øðrum orðum siga, at vit eru farnar aftur um úrslitini í fyrru kanningini fyri at lýsa úrslitini neyvari.

Í fyrru kanningini tóku 1277 næmingar í 4., 6. og 9. flokki lut.

Í hesi seinni kanningini hava vit givið næmingum í 6. flokki eina rødd. Orsøkin til, at vit hava valt næmingar í 6. flokki er tí, at vit síggja, at tað er her, at eitt stórt skifti hendir í lesitíttleikanum.

Høvuðsúrslitini í tí fyrru kanningini verða váttað í teirri seinni kanningini. Havast skal í huga, at talan ikki er um somu børn, ið verða spurd í báðum kanningum.

Í frágreiðingini varpa úrslitini ljós á nøkur týðandi viðurskifti viðvíkjandi lesing hjá børnum, og hvussu vit miðla bókmentir til teirra, so tey menna og halda fast í góðar lesivanar og lesiupplivingar.

Fyrra kanningin staðfestir, at lesimentanin í skúlum kring landið er sera ymisk, og hendan nýggja kanningin váttar hetta.

Úrslitini vísa, at nógvir skúlar leggja nógva orku í at styrkja og menna góðar lesivanar, men summir halta aftaná, og næmingarnir hava í samrøðunum víst á, hvat skal til fyri at menna lesiumhvørvið.

Niðanfyri verður víst á týdningarmestu úrslitini úr samrøðunum í kvalitativu kanningini. Tey verða býtt sundur eftir økjunum samsvarandi greiningini av úrslitunum.

### Næmingar og teirra hugburður til lesing

- Kanningin vísir, at lesingin í skúlatíðini, bæði inni í flokkunum og felags lesiátøk, er sera ymisk í ymsu skúlunum og í ymsu flokkunum.
- Í nógvum flokkum lesa lærarar skúlatingini upp fyri næmingunum, áðrenn teir fara heim.
- Ymiskt er frá skúla til skúla, hvussu lesiátøkini verða skipað, og hvussu nógv tíð verður brúkt til átøkini.
- Í samrøðunum kemur fram at frílesing í 6. flokkum er ikki skipað, reglulig og tykist ikki at hava eina greiða ætlan.
- Tað kemur fram í samrøðunum, at mest verður lisið upp av fakligum tilfari; minni verður lisið upp ella fortalt av skaldskapi, har ið næmingurin kann liva seg inn í hendingar og frásøgn.
- Tað sæst í kanningini, at stór spjaðing er í, hvussu nógv børn í 6. flokki lesa heima.
- Tey flestu siga, at mamman er tann, ið syrgir fyri, at tilmælini frá lærarum um at lesa heima, verða sett í verk.
- Børnini siga, at tey tosa ikki nógv sínámillum um tað at lesa.
- Nógv tey flestu siga, at tað er umráðandi at lesa.

### Hvat næmingar siga um útboðið av bókum at lesa

- Tey flestu høvdu lisið meiri, um tey vistu um onkra góða bók, ella um fleiri bøkur vóru um evni, tey hava áhuga fyri.
- Nógv tey flestu vilja helst lesa á føroyskum; enskt er á øðrum plássi og síðan danskt.
- Mest sum øll lesa helst bók á pappíri.
- Tey, sum tíma at lesa, tíma at lesa um alt, men tey tíma serliga væl spennandi og stuttligar søgur.
- Nógv, serliga dreingir, tíma væl at lesa um søgulig evni.
- Nógv meta um bókina út frá tjykd, permu og baksíðuteksti, men tey hava lítið tol við bókini, um hon ikki svarar til tað, tey vænta av henni.
- Nógv tey flestu brúka talgildu miðlarnar at reika á og lesa stutt um ymiskt.
- Nógv tey flestu lesa ikki langar samanhangandi tekstir á talgildu miðlunum.

### Hvussu næmingarnir brúka og fata skúlabókasavnið

- Tað er sera ymiskt, hvussu ofta næmingar vitja skúlabókasavnið. Spennið er frá dagliga til ongantíð.
- Nógvir næmingar duga ikki at finna góðar bøkur.
- Nógvir næmingar siga, at tað nyttar ikki at spyrja tey vaksnu um hjálp at finna eina góða bók, tí tey vaksnu spyrja ikki, hvat tey tíma at lesa um.
- Nógv siga, at tey fáa eina tilvildarliga bók, sum er ov torfør.
- Sera nógvir næmingar siga, at tey spyrja ikki tey vaksnu um ráð, tí tey fáa onga hjálp at finna røttu bókina.

# Øki, ið krevja serligt uppmerksemi

**Tað er álvarsamt**, at nógvir næmingar lesa lítið av fakligum teksti og lítið av skaldskapi, tí tá er vandi fyri, at lesiførleikin ikki verður nóg væl mentur ígjøgnum skúlatíðina.

Lesingin, ið byggir á skriftmálið, er lykilin og grundvøllurin undir øllum lærugreinum.

Okkara fólkaskúli er skipaður í árgangir. Tað er ikki tilvild. Tað hevur við sær eina støðuga og stigvísa hækking í torleikastignum á tilfari og innihaldi ígjøgnum øll skúlaárini.

Undanfarin ár leggja lunnar undir komandi ár.

Kemur stígur í menningina hjá einum næmingi, so fær hann ilt við at megna tær avbjóðingarnar, ið hann møtir ígjøgnum tilfarið og innihaldið í skúlagongdini.

## Munurin á talumáli og skriftmáli

Talumálið er ein meiri grundleggjandi málformur enn skriftmálið, tí talumálið er okkara fyrstamál, tað vil siga, at tað er málið, sum vit ogna okkum fyrst í lívinum. Tað er okkara móðurmál, sum vit ogna okkum frá tí, vit eru ikki ársgomul. Við fyrstamáli verður bert hugsað um talumálið ella teknmálið hjá deyvum. Meirilutin av heimsins íbúgvum hevur talumál sum fyrstamál. Málsligu evnini eru givin teimum flestu.

Øll læra fyrstamálið tíðliga í lívinum, um tey ikki hava serligar fysiskar ella kognitivar avbjóðingar; hetta hóast eingin lærir okkum tað sum so.

Vit læra talumálsreglurnar meir ella minni ótilvitað, og tey flestu læra seg reglurnar líka væl.

Talumálið er einfalt og óskipað, og tað er í stóran mun knýtt at kropsmáli t.d. rørslum, kropsburði, keipum, andlitsbrøgdum, tónalagi og støðuni, sum vit eru í, og hvønn vit tosa við.

Øðrvísi er við skriftmálinum.

Skriftmálið er ikki nakað, sum meirilutin av heimsins íbúgvum hevur. Tað er skipað og stýrt av normum og reglum, sum áseta, hvussu orð verða bend og stavað, hvussu orð verða sett saman til setningar, hvussu setningar verða skipaðir, og hvussu tekn skulu setast.

Í skriftmálinum eru setningar skipaðir í yvir- og undirskipaðar setningar, ið standa saman, tá ið talan er um tíðarraðfylgju, logikk og orsakarviðurskifti.

Vit læra ikki skriftmálið automatiskt. Tað verður lært í skúlanum ígjøgnum undirvísing.

Tað krevur miðvísa læring og nógva venjing at ogna sær tað, og tað er hetta málið, ið lesingin byggir á.

Torleikastigið í skúlabókum hækkar, sum áður nevnt so líðandi, so lesiførleikin hjá barninum verður mentur ár fyri ár ígjøgnum tekst, ið verður meiri og meiri kompleksur sum frá líður.

Soleiðis flytur barnið seg frá at lesa einfaldan tekst til at lesa abstraktan tekst.

Tá ið tað er sagt, so er eisini sagt, at um barnið lítið og einki lesur, so víðkast og mennist lesiførleikin ikki í tann mun, ið er neyðugur, so tað kann fóta sær í skúlaskipanini.

Tí er tað so neyðugt, at barnið javnt og samt fær avbjóðingar innan lesing á hækkandi torleikastigi.

Umfatandi norsk kanning, sum fevndi um 4458 norsk børn (sí notu aftast í frágreiðingini), ið granskarar fylgdu í trý ár, staðfesti m.a. fylgjandi:

> „Hvis barna opplever mestring i det faglige på skolen, kan det ha en positiv innvirkning på den psykiske helsen …“

> „Resultatene støtter tidligere funn om at det er en sammenheng mellom psykiske utfordringer og skoleprestasjoner, men viser, at det først og fremst er svake skoleprestasjoner i tidlig grunnskolealder, som kan føre til senere psykiske utfordringer.“ (sí notu)

Sum kvalitativa kanningin av lesivanunum bendir á, so er tað so ymiskt, hvørjar lesiavbjóðingar næmingar fáa. Tað veldst undirvísing, og hvussu tilvitað foreldrini eru um lesing heima.

# Skúlin sum vitanarberi

## Faktatekstir og tilognan av vitan

Vit síggja í kanningini, at nógvir lærarar velja at lesa faktatekstir upp fyri næmingunum í tímunum, áðrenn teir fara heim.

Summir næmingar siga tískil, at teimum nýtist ikki at lesa skúlatingini heima, tí lærarin longu hevur lisið tekstin upp í skúlanum, og tey tí kenna tekstin.

Sum longu nevnt eru faktatekstir serligir tekstir, ið eru bæði kompleksir í bygnaði og abstraktir í innhaldi.

Faktatekstir miðla vitan, og teir krevja eisini undanvitan, um lesarin skal skilja innihaldið. Sí hetta dømi úr faktateksti úr søgubókini til 8. flokk:

> „Í Ríkisdagstíðindum (gerðabókum fólkatingsins og landstingsins) og Løgtingstíðindum eru viðhvørt hagtøl viðvíkjandi Føroyum í sambandi við mál, sum hava verið til viðgerðar. Seinast í 19. øld, eftir at búskaparfrøðin var vorðin vísindalærugrein fyri seg, fóru at koma verulig samskipað hagtøl frá almennum hagtalsstovnum. Tey skuldu vera politiskum stovnum og umsitingarstovnum til hjálpar.“ (*Heimssøga* 2, s. 124)

At lesa og skilja slíkan tekst krevur góðan lesiførleika saman við venjing í abstraktari hugsan og haldgóðari undanvitan, um næmingurin skal kunna tilogna sær innihaldið og megna at teingja tað saman við tí, sum hann longu veit.

Tí er umráðandi, at allir næmingar fáa dygga venjing í at ogna sær henda lesiførleikan.

## Skúlin sum mentanarberi

Amerikanski Jerome Bruner (1915-2016), var útbúgvin innan sálarfrøði og hevði serligan áhuga fyri læring og narrativiteti; hann helt uppá, at tað er mentanin, ið formar okkara tilvit og gevur okkum amboð, ið vit brúka at tilevna okkara fatan av okkum sjálvum, okkara umheimi og okkara førleikum.

Hann hevði ta fatan, at fremsta uppgávan hjá skúlaskipanini er at menna førleikarnar hjá børnum at brúka tey amboðini, sum mentanin hevur at bjóða.

Henda fatanin hjá Bruner sæst aftur í endamálsorðingini í fólkaskúlalógini, tí hon leggur áherðslu á, at lærarar skulu ikki bara vera vitanarberar, men eisini mentanarberar.

Soleiðis kunnu næmingarnir læra at fóta sær og kenna seg aftur í síni heimligu mentan, samstundis sum teir eisini læra at virða aðrar mentanir, og læra at fara væl um og virða náttúruna, soleiðis sum tey, ið undan fóru, gjørdu.

Lærarar skulu eisini sambært endamálsorðingini í fólkaskúlalógini búgva næmingar til innlivan, til samavgerð og samábyrgd, eins og teir skulu vísa teimum á rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelagi.

Lærarar skulu grunda undirvísing og samspæl á andsfrælsi, tollyndi og javnvirði.

Hetta eru lærarana mentanarligu navigatiónsamboð, so næmingar kunnu ogna sær felags samfelagsligu virðini, og lærarin skapar við síni frásøgn undanvitan.

Hetta speglast aftur, tá ið næmingar í skúlunum savnast til morgunsang, flaggdagshald, ynskja tjaldrinum vælafturkomnum, læra kvæði og at kvøða, lurta eftir føroyingasøgu, skaldskapi, umframt so mangt annað, ið savnar okkum sum fólk og tjóð.

## Munnliga frásøgnin týðandi mentanartáttur

Fleiri næmingar gera vart við í lesivanakanningini, at tað verður ikki nógv fortalt ella lisið upp fyri teimum í tímunum.

Summi siga, at meiri varð gjørt burtur úr tí fyrr.

Tað eru eisini tey, ið siga, at tað als ikki verður hvørki sagt frá ella lisið upp í tímunum.

Eitt eru tó næmingarnir samdir í, og tað er, at teimum dámar sera væl at lurta eftir frásøgn og upplestri, og somuleiðis siga teir, at teir sakna henda táttin í undirvísingini.

Munnliga frásøgnin hevur verið týðandi táttur í føroyska gerandisdegnum.

Vit kenna til samkomur um kvøldið, ið eru umrøddar og lýstar í *Færøsk Anthologi* eftir Hammershaimb sum „kvøldseta“, tá ið fólk savnaðust í roykstovuni og tilvirkaðu ullina, samstundis sum kvøðið varð um fornar kappar.

Eisini var prátað og fortalt um m.a. myrkursins gykladu skapningar, og tey, ið inni vóru, sótu kvirr og bórust burtur í aðrar heimar.

Skaldskapurin av mannamunni stóð sterkur og setti orð á fyribrigdi í tátíðarsamfelagnum, samstundis sum hann styrkti kensluna at hoyra til eina mentan og ein felagsskap.

Soleiðis var mál og mentan borin ímillum ættarliðini fyri meiri enn hundrað ár síðan.

## Í nýggjari tíð

Heilt fram til ár 2000, um 100 ár seinni, var mál- og mentanarflutningurin í heimunum og familjunum týdningarmikil kelda ímillum ættarliðini. Tað var vanligt at sita saman og kjakast ella fortelja ella práta.

Børn og hálvvaksin sótu undir hvørjum orði, tá ið tey vaksnu fortaldu ella kjakaðust, og soleiðis lærdu tey ein hóp um mentanina, um frásagnarkynstrið, styrktu málkensluna og málsliga tilvitið.

Eftir talgilda tøknin er vorðin so vanlig og týðandi í gerandisdegnum hjá bæði vaksnum og børnum, sita nógv fólk ofta tigandi hvør í sínum lagi í talgildum heimum, hóast tey sita í sama rúmi.

Tískil er mál- og mentanarflutningurin ímillum ættarliðini nógv viknaður hesi síðstu 20 árini.

Familjan og heimið røkja ikki somu uppgávu í dag. Frásøgnin, kjak, prát og lesing hevur ikki tað rúmið í felagsskapinum heima sum fyrr. Greiðar ábendingar eru um hetta í kanningini, og øll vita tað av egnum royndum, at so er ikki.

So mikið meiri týðandi er tað, at skúlin er tilvitaður um hesa støðuna og tekur hesa uppgávu á seg.

## Frásøgn og upplestur sum mentanarberi

Ein faktatekstur er eyðkendur av, at málbúnin er denotativur, talar til vit og skil, ber vitan, og innihaldið er óheft og ofta kunnandi. Teksturin er ofta afturlatin skilt á tann hátt, at hann er ætlaður ávísum lesara við ávísari undanvitan, so ein og hvør ikki er førur fyri at skilja hann.

Skaldskapur hinvegin er eyðkendur av, at málbúnin er konnotativur. Serligt eyðkenni er myndaligi málburðurin, ið talar til okkara kenslur og okkara sansar.

Skrivingarlagið er merkt av stilistikki og snildum. Innihaldið er subjektivt og opið, soleiðis at lesarin kann lesa seg inn í tekstin.

Lesarin er ein viðleikari í tekstinum.

Skaldskapur er ein serlig og øðrvísi lesiavbjóðing, tí vit har møta einum konnotativum máli.

Vit mugu læra at lesa ímillum reglurnar, læra at skilja tað ósagda ímillum orðini, tey tómu plássini, ið standa og gapa eftir okkum, og sum vit kunnu hvørva inn í, læra at avkoda myndir og hugasambond, ið krevja, at vit lesa og skilja eina flutta merking.

At lesa skaldskap mennir hugflogið og abstraktu ímyndingarevnini. Vit noyðast at lesa á fleiri planum.

Tað fremur førleikan at avkoda og fata ósøgdu orðini og fleirtýddu myndirnar, ið eru allastaðni uttan um okkum.

Skaldskapur byggir sostatt ein ímyndaðan heim við egnum amboðum sum narratión, plot, symbolum, myndburðum og øðrum snildum, og hann hevur rót í tí veruleikanum, sum hann sprettur úr og virkar í.

Vit kunnu eisini nevna ímyndaða heimin fyri eitt parallellunivers til veruligu verðina.

Lesarin er vitandi um hetta og góðtekur henda „sum-um-heimin", eisini nevndur tykisheimur.

# Týdningurin sum skaldskapur hevur fyri okkum sum menniskju

Vit menniskju lesa av ymsum orsøkum. Vit kunnu lesa fyri at fáa innlit í, hvussu onnur menniskju fóta sær í lívinum, hvussu tey megna ymsar avbjóðingar, hvussu tey hugsa og føla í ymsum støðum og lívsskeiðum.

Børn og ung eru sera áhugað at lesa um onnur børn og ung. Tey lesa um sambandið við onnur, um familjuviðurskifti, um skilnað, um vinarbond og um kærleika. Hetta eru alt sambond og viðurskifti, ið hava stóra ávirkan á teirra egna gerandisdag, og sum kann geva teimum innlit í, hvussu onnur klára at loysa trupulleikar og avbjóðingar í nærsambondum.

Í hesum bókum sleppa tey inn í høvdið á øðrum menniskjum. Tey lesa um, hvussu hesi hugsa, og hvørjar kenslur tey hava. Tað ber bara til í skaldskapi. Og hóast hesi menniskju eru óverulig, tí tey ganga jú ikki ímillum okkum og standa ikki í fólkayvirlitinum, so eru tey so verulig og mannlík, at vit taka tey til okkum uttan fyrivarni.

Vit kenna okkum aftur í teimum og fáa innlit í tað at vera menniskja og at vera partur í einum felagssakpi. Vit fáa innlit í okkum sjálv, og vit fáa innlit í onnur.

Granskarar vísa á, at okkum tørvar søgur og skaldskap. Vit finna okkum til rættis í lívinum ígjøgnum søgur. Børn brúka eitt nú spæl og søgur at spegla sær í, at royna seg í, at læra í og at menna seg í.

Vit lesa skaldskap fyri at læra um okkum sjálv og onnur, sambært granskaranum Hansjörg Hohr (f.1949), dr. philos. í námsfrøði og estetikki á universitetinum í Oslo.

Vit lesa fakbøkur og skúlabøkur fyri at læra og fáa vitan og innlit í ytra heimin, men skaldskapur og søgur menna og ríka innara heimin hjá vaksnum og børnum.

Hansjörg Hohr metir kenslurnar sum tað grundleggjandi, og sum tað, ið upplivingar og grundan menna seg frá.

Tá ið børn spæla og lesa víðka og menna tey samleikan, sigur hann. Hann javnsetir spæl og søgur/lesing og metir tey sum eitt kensluligt og moralskt kanningarrúm.

Í hesum kanningarrúmi ber til at viðgera og endavenda upplivingum, at varpa ljós á hendingar og loyndarmál, ið hava í sær sterkar kreftir og kenslur, á ein súmbolskan hátt. Tvs. at í hesum tykisheimum ber til hjá okkum at finna tilsvarandi hendingar, ið okkum hevur verið fyri, at grunda um tær, at skoða upplivingarnar úr ymsum sjónarhornum og at fáa betri tamanhald á fløktum kenslum ella at lekja sár.

Eisini kunnu vit lesa um um støður og umstøður, sum vit kanska ongantíð sjálv koma í, og kortini kenna okkum aftur í persónunum.

Vit fáa innlit í, at vit eru ymisk, hava ymisk kor og ymsar fortreytir, og soleiðis kunnu vit læra um

okkum sjálv ígjøgnum onnur, læra at skilja onnur, ið eru øðrvísi, enn vit sjálv, meðan vit sjálv sita heitt og fjálgt í tryggum umhvørvi.

Soleiðis kann bókin geva okkum eina djúpari sannkenning av bæði umheiminum og okkum sjálvum.

Hetta er tað týdningarmesta, ið søgur/bókin hevur at geva okkum: innlitið í okkara egna dýpi og víðskygni út í heim, sambært Hohr.

Vit menna okkara innlivingarevni – vit fata onnur betur – og okkara einsemiskensla minkar, tí vit skilja, at vit eru partur í einum størri felagsskapi, tí vit kenna okkum aftur í øðrum menniskjum.

Tað fremur tolsemi, samkenslu og empati, ið sampakkar við endamálsorðingina á fólkaskúlalógini.

Lesingin kann soleiðis dýpa okkara sannkenning og rúmka okkara hugburð og fatan av øðrum, tí vit gerast tilvitin um, at vit menniskju hoyra til sama felagsskap, tó at vit kanska liva í ymiskum samfeløgum og hava ymiskar tilverutreytir.

### Skaldskapur styrkir felagsskapin

Ein annar granskari og professari við sama universitet, bókmentafrøðingurin Per Thomas Andersen, fer so langt sum at siga, at um demokratiska samfelagnum skal verða lív lagað í framtíðini, so er alneyðugt, at vit menna okkara innlivingarevni, so vit eru før fyri at føla ella samkenna við okkara medmenniskju, tí eru vit ikki tað, so syndrast felagsskapurin og tolsemi okkara millum.

# Lykil til framtíðina

**Góður lesiførleiki** er ein lykil til framtíðina hjá barninum.

Vit vita øll, at tað er neyðugt at duga at lesa fyri at klára seg í dagsins samfelag. Førleikarnir hjá okkum mugu sampakka við tørvin á arbeiðsmarknaðinum, so vit kunnu breyðføða okkum.

Vánaligur lesiførleiki hjá fólki skerjir møguleikarnar fyri luttøku í øllum høpum.

Øll børn skulu hava sama rætt og somu atgongd til tað, sum tey vilja verða ein dag.

Vit sum vaksin, og sum hava umsorgan fyri børnum – óansæð um tað er heima ella í skúlanum – kunnu tryggja børnum henda rættin við at stuðla teirra menning og geva teimum hóskandi avbjóðingar.

### Gransking og menning

Ein háttur at tryggja menning og góða dagførda undirvísing er at tryggja, at tað verður granskað í føroyska fólkaskúlanum og viðurskiftum hjá børnum í einum føroyskum samteksti. Hyggja vit at tí, sum verður játtað til gransking og menning í fólkaskúlanum í Føroyum, kunnu vit skjótt staðfesta, at tað er ógvuliga lítið, og samanborið við onnur øki í samfelagnum nærum einki. Í yvirliti, sum Granskingarráðið hevur gjørt yvir verkætlanir, sum hava fingið játtað stuðul frá ráðnum í tíðarskeiðinum 2002-2020, hava bara nakrar heilt fáar verkætlanir í gransking í skúlaskapi og fólkaskúlaøkinum sum heild fingið stuðul. Hetta tíðarbilið hava 214 verkætlanir fingið játtað stuðul. Verkætlanirnar, sum kanna viðurskifti í fólkaskúlanum, eru bara fimm í tali.

Aðrar verkætlanir enn tær, sum standa í yvirliti frá Granskingarráðnum, kanningar og frágreiðingar, størri og smærri, eru gjørdar; summar teirra hevur Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum verið partur av saman við Mentamálaráðnum og kommunum. Samanlagt er tó ikki talan um nógvar.

Á hvørjum ári hava skúlar høvi at søkja Undirvísingarstýrið um at sleppa undir royndar- og menningarvirksemi í fólkaskúlanum. Síðstu tvey árini hava um 25 verkætlanir fingið játtað tímar; verkætlanirnar vara vanliga trý ár, men skúlarnir skulu søkja á hvørjum ári eftir tímum. Í yvirliti yvir verkætlanir í royndar- og menningarvirksemi sæst, at tað í stóran mun eru verkætlanir innan handaligu lærugreinirnar, kunningartøki, rørslu, ráðlegging, samstarv, trivnað og annað, sum fáa játtað tímar. Tær verkætlanirnar, sum skúlaárið 2021-2022 hava fingið størst stuðul, hava við trivnað í fólkaskúlanum at gera. Verkætlanir í bókligu lærugreinunum og bókasavni eru ikki at síggja á listanum yvir verkætlanir, sum fáa stuðul.

Søguliga hava vit altíð helt okkum til norðurlendska gransking og kanningarúrslit. Henda granskingin er týdningarmikil at hava og kunna seg við, hon kann varpa ljós á týdningarmikil øki hjá okkum, men tað hevur eisini týdning at granska í okkara egnu viðurskiftum.

Ivaleyst er tað ein samansett orsøk til, at tað verður so lítið granskað og kannað í skúlaviðurskiftum og skúlaskapi í Føroyum. Sambært stjóranum í Granskingarráðnum er orsøkin lutvíst, at skúlaskapur sum granskingarøki ikki er sterkt, og lutvíst at ov lítið av fígging er til alla gransking.

Granskingarráðið letur fígging til tveir triðingar av tí, ein ph.d-verkætlan kostar; við øðrum orðum skulu tey, sum granska, finna fígging aðrastaðni eisini, og tað kann vera ein stór avbjóðing, tá ið talan er um gransking í skúlaskapi. Skúlaverkið og øll útbúgvingarskipanin sum hon er er grundarlagið undir okkara vælferð og Føroyum sum vitanarsamfelag. Ikki minst av teirri orsøk hevði tað verið gagnligt, um tað var granskað meiri í tí, sum eyðkennir okkara skúla, har íroknað móðurmálsundirvísingini og øllum tí, sum er knýtt at henni.

### Íblástur til nýggjar kanningar

Við báðum verkætlanunum, sum vit hava arbeitt við innan lesing og lesivanar, eru vit farnar í dýpdina við nógvum spurningum, sum hava við lesing og lesivanar í breiðastu merking. Úrslit og niðurstøður í báðum kanningunum kasta ljós á nýggjar, ósvaraðar spurningar. Økið lesing, lesarar og lesivanar er torgreitt, og nógvir spurningar eru, sum arbeiðast kann víðari við.



# Felags stev í lesing við lesiætlan

**Ein lesiætlan stingur** út í kortið, hvør lesimentan ger seg galdandi í skúlanum og er harumframt ein virkisætlan, sum inniheldur mál og mið fyri undirvísingina í lesing. Skal lesimentanin vera inngrógvin partur í huganum á teimum, sum virka í skúlanum, bæði lærarum og næmingum, er umráðandi, at karmar og umstøður verða skapt, sum leggja upp til eina sterka lesimentan í øllum liðum í skúlanum, og at hon er forankrað í leiðsluni.

Virkisætlanin kann vera yvirskipað ella neyv. Er hon ov yvirskipað, kann vandi vera fyri, at málini í henni gerast ov leys, og hon bara verður viðfáningur. Er hon ov neyv, kann hon kennast at stýra teimum, sum skulu virka eftir henni, ov nógv niður í smálutir. Tað týdningarmesta er, at virkisætlanin verður tikin fram fyrst í skúlaárinum, eftirmett og viðgjørd, at starvsfólk skúlans regluliga taka hana fram á námsfrøðiligum fundum, umframt kjaki og orðaskifti í skúlanum, og at semja er millum leiðslu og lærarar um, at arbeitt verður sambært henni.

Ein lesiætlan kann snúgva seg um:

*Skúlan sum heild:*

- leiðreglur um, hvussu lesing fær góða rúmd og góðar umstøður í gerandisdegnum
- ásetingar av átøkum at fremja og kveikja lesingina, so sum lesiløtur, lesivikur, lesiringar og líknandi
- at bøkur og tilfar javnan verður dagført
- hvussu skúlastovurnar verða innrættaðar, soleiðis at fjølbroytt úrval av bókum, ið eru hóskandi til aldurin hjá næmingunum, altíð eru atkomiligar

*Undirvísing og læring:*

- tilmæli um, hvussu undirvísingin í hvørjum flokstigi sær verður skipað
- leiðreglur um, hvussu lesing verður partur av undirvísingini
- tilgongdir, tá ið talan er um eftirmeting av undirvísingini í lesing fyri hvørt floksstig
- leiðreglur um, hvussu lesing verður partur av ársætlanunum í øllum bókligum lærugreinum
- samstarv millum lærarar tvørtur um lærugreinir, sum hevur til endamáls at lyfta lesingina
- leiðreglur um, nær og hvussu lesiførleikarnir hjá næmingum verða eftirmettir
- leiðreglur um, hvussu næmingar, ið hava trupulleikar at lesa, fáa góða og skjóta hjálp
- hvør uppgávan hjá lesivegleiðarunum er
- regluligar námsfrøðiligar fundir, sum varpa ljós á viðurskifti, ið hava við lesing og lesivanar at gera

*Skúlabókasavnið:*

- hvussu bókasavnið kann verða brúkt í øllum lærugreinum
- hvørji tiltøk bókasavnið kann skipa fyri
- hvussu bøkur verða miðlaðar næmingum og lærarum

- hvør leikluturin hjá bókasavninum kann vera, tá ið talan er um lesiátøk

*Samstarvið millum skúla og heim:*
- samstarv millum skúla og heim, soleiðis at lesingin verður lyft í felag
- tilfar til foreldur á ymsu floksstigunum, soleiðis at tey verða kunnað um týdningin at lesa og hava góðar lesivanar

Lutmál kunnu verða sett við hvørt einstakt mál, soleiðis at tey verða greinað og lýst neyvari. Eitt hugskot er eisini á hvørjum ári at seta nýggj mál og nýggj kjarnuøki, sum skúlin varpar ljós á.

**Dømi:**
Í ár vilja vit:
- at meiri tíð verður sett av til at lesa í skúlanum, eitt nú við at allur skúlin lesur fyrsta skúlatíma hvønn dag (eitt tíðarskeið)
- at skúlabókasavnið skipar fyri fleiri stuttligum lesifremjandi átøkum
- at lesifremjandi umhvørvi verða skapt í skúlastovunum
- at lesiambassadørar verða settir fyri hvørja deild sær at kunna flokkar um nýggjar bøkur
- stovna lesiringar fyri lærararnar

Av tí at lesing leggur grundina undir øllum tí, tú lærir øll árini í fólkaskúlanum, er umráðandi, at starvsfólk skúlans á øllum floksstigum hava felags stev, tá ið talan er um lesing og skapa umstøður fyri lesigleði. Gongur allur skúlin við leiðsluni á odda undan við at raðfesta lesing og góðar lesivanar frá fyrsta degi, yngstu næmingarnir møta í skúlanum, til tey elstu gevast í skúlanum eftir lidna skúlagongd, eru góð útlit fyri góðari lesimentan í skúlanum. Lesing eigur at fáa góða rúmd í skúlanum og sum heild verða raðfest høgt sum partur av øllum lærugreinum, sum ein hjálp at fáa sum mest burtur úr øllum lærugreinum og at verða sædd sum ein grundførleiki. Við lesiætlanum kunnu vit virka við til, at næmingarnir taka seg fram í menningini av lesiførleikanum samsvarandi floks- og aldursstigi, og at teir ogna sær góðar lesivanar fyri lívið. Tað týdningarmesta er ein skipað lesimentan, sum leggur dent á lesing og lesihug, og sum er forankrað í leiðsluni og øllum liðum í skúlanum.

# Kjarnuøki

**Við støði í tí**, sum kemur fram í samrøðunum við næmingar, eru nøkur øki, sum vit meta eiga at verða styrkt og ment fyri at skapa eina góða lesimentan. Ein fortreyt fyri at menna eina góða lesimentan er, at lesihugurin verður kveiktur við, at næmingarnir megna at finna røttu bókina, og at skúlin skapar karmar fyri, at næmingarnir sleppa at fordjúpa seg í bókini uttan annað endamál enn at hvørva inn í ta góðu søguna. Hugurin at lesa er støði undir eini góðari lesimentan og øvut.

*Uppgávan hjá teimum vaksnu sum heild:*
- at spyrja børnini, hvat tey tíma at lesa um og saman við teimum finna røttu bókina
- at vera virkin og stuðla børnunum
- at skapa rúmd og tíð til lesing
- at góðtaka, at tað tekur tíð og krevur áhaldni at ogna sær góðar lesivanar

*Uppgávan hjá skúlanum og skúlabókasavninum:*
- at orða eina lesiætlan
- at samstarva við foreldur um at menna lesihugin
- at skipa fyri bókasavnskunning
- at skipa fyri framsýningum, framførslum, upplestri og øðrum tiltøkum
- at kunna seg við nýggjar bøkur og miðla tær til børnini

*Uppgávan hjá lærarum:*
- at hjálpa barninum at finna røttu bókina
- at skapa rúm fyri, at nógv verður lisið í miðdeildini
- at halda næmingum í hádeildini til at lesa
- at lesa upp fyri børnum á øllum floksstigum
- at leggja dent á ta góðu søguna og lesiupplivingina
- at umhugsa endamálið við at loysa uppgávur
- at leggja dent á ta góðu samrøðuna um tað lisna
- at taka støði í áhuga og upplivingum hjá næmingunum í undirvísingini

# Niðurstøða

**Bæði í kvantitativu- og kvalitativu** lesivanakanningini sæst, at eitt skifti fer fram í okkara samfelag. Heimið hevur saman við skúlanum verið karmur um sosialiseringina av børnum okkara, og hesir báðir stovnar hava staðið saman um barnið; teir hava alt tað upp og givið tí vitan og mentanarliga førning, so tað kundi fóta sær í gerandisdegnum.

Eftir aldarskiftið hava tøknin og talgildu miðlarnir ment seg, og tey hava broytt bæði samfelagið og samspælið okkara millum hesa tíðina, ið farin er av øldini. Heimalívið við sosialari samveru og tøttum sambondum ímillum ættarliðini er munandi viknað hesi árini. Í staðin fyri lestur, livandi frásøgn, kjak og prát, ið heimið var karmur um, er tøknin vorðin ein týðandi partur í lívinum hjá okkum øllum. Hon gevur okkum nýggjar møguleikar. Nú kunnu vit flyta okkum út um teir fýra veggirnar og reika saman við øðrum, tó at vit sita heima í stovuni ella eru inni í einum skúlahøli. Vit eru ikki longur avmarkað av tíð og staði, men hava frítt at fara.

Felagslívið og samanhaldið í samfelagnum er í broyting. Vit hava ikki longur eins sterkan felags veruleika sum fyrr, tá ið øll lurtaðu eftir tíðindunum í Útvarpi Føroya samstundis. Nú fáa vit tíðindi og upplýsingar úr ymsum heraðshornum og ígjøgnum ymiskar miðlar allar tíðir av døgninum.

Tey ungu og børn okkara kunna seg ikki á somu miðlum sum tey vaksnu. Tey kunna seg á øðrum støðum. Tá tey ungu og børnini liva í so ymiskum veruleikum, so eru tað ikki neyðturviliga skúlin og heimið, ið mynda tey, og upplýsa ella menta tey.

Samstundis síggja og hoyra vit, hvussu enskt otar seg inn í føroyska málið. Bæði stór og minni børn brúka enska málið, ið tey læra ígjøgnum miðlarnar, í gerandissamskiftinum við javnaldrar. Vit hoyra um børn í miðdeildini, ið tosa enskt sínámillum í skúlatíðini. Sama frætta vit um í eldri flokkunum. Báðar lesivanakanningarnar vátta ógvusligu ávirkanina, ið enskt hevur á føroyskt. Sama ger nýggj greining av skriviførleikanum hjá 9. floksnæmingum, ið vísir, at ensk ávirkan sæst í øðrum hvørjum stíli, meðan donsk ávirkan einans sæst í triðja hvørjum stíli.

So kunnu vit siga, at hetta er gongdin og tíðarandin, at samfelagið og tilvitið flytur seg inn í talgilda heimin, tí har er framtíðin. Ein málkønur segði, at um hetta er gongdin, at enskt otar seg inn í føroyskt og skeiklar setningsbygnað og bendingar, og børnini missa málkensluna og heldur tosa enskt enn føroyskt, so er føroyskt burtur sum mál eftir trý ættarlið.

Og hvat so, kunnu vit spyrja. Bókin og tað at gloyma seg burtur í eini góðari søgu er fyri nógv ein farin tíð. Nú er tann góða søgan atkomulig døgnið runt sum filmur ella raðsendingar á Netflix og líknandi pallum. Lesingin er ov tíðarkrevjandi og keðilig. Vit klára okkum á talgildum miðlum, har vit lætt og skjótt kunnu flyta okkum ímillum eitt ótal av stutttíðindum og upplýsingum.

Men so einføld er okkara atgongd til framtíðina tíverri ikki. Vit kunnu bara tilogna okkum lesiførleika ígjøgnum støðuga venjing. Allur førleiki, sum t.d. ítróttur og tónleikur, krevur støðuga og miðvísa venjing, um vit vilja mennast.

Okkara fólkaskúli er skipaður í árgangir, og tað tryggjar eina støðuga og stigvísa hækking í torleikastignum á tilfari og innihaldi ígjøgnum øll skúlaárini, soleiðis at undanfarin ár leggja lunnar undir komandi ár. Soleiðis tryggjar skúlaskipanin, at næmingar kunnu mennast ígjøgnum miðvísa læring ár undan ári.

Kvalitativa lesivanakanningin vísir týðiliga, at sera ymiskt verður lisið runt um í skúlunum kring landið. Í nógvum skúlum verður nógv lisið javnt og samt. Hesir næmingarnir verða mintir á at lesa heima, og teir vitja ofta skúlabókasavnið. Í øðrum skúlum verður lítið og einki lisið dagliga, og hesir næmingarnir verða ofta ikki mintir á at lesa heima, og ofta hava teir ikki atgongd til skúlabókasavnið dagliga.

Kanningin staðfestir, at munurin er stórur á flokkum og skúlum, eisini flokkum í sama skúla, og á teimum avbjóðingum, ið næmingarnir fáa.

Lesingin í fleiri skúlum tykist sambært útsagnum frá næmingunum at vera óskipað og merkt av tilvild. Hesir næmingar, ið lesa lítið, eru við skerdan lut, og fakligi førleikin mennist ikki aldurssvarandi. Annað er, at hevur næmingur lítið og einki samband við skriftmálið, so verður orðfeingið fátækt, og málkenslan rýkur. Tá verður enskt ein størri hóttan fyri føroyska málið.

Vit kunnu spyrja, um tað er í lagi, at munurin kring landið er so stórur? Vit síggja einstaklingar og heilar flokkar, sum hava ein jaligan hugburð til lesing og lesa nógv og ofta, men vit síggja eisini einstaklingar og aðrar flokkar, sum hava ein neiligan hugburð til lesing og lítið og einki lesa. Hetta hóast undirvísarar hava somu útbúgving, sum oftast verða útbúnir á sama stovni, og í stóran mun brúka sama tilfar í undirvísingini. Kunnu vit góðtaka, at tað er so stór variatión, og at tað er so misjavnt, hvørja læring og úrtøku næmingar fáa?

Annar spurningur er, hvussu vit kunnu framtíðartryggja samfelag okkara, tá ið vit kunnu staðfesta, at ein stórur partur av næmingunum ikki lesur nóg mikið og nóg ofta? Vandi kann vera fyri, at tá ið lesiførleikin ikki mennist aldurssvarandi, verður føroyska arbeiðskraftin afturúrsigld sum frá líður, tí hon ikki verður førleikament svarandi krøvunum á arbeiðsmarknaðinum í hátøkniliga samfelagnum.

Hvussu kunnu vit hjálpa og stuðla komandi ættarliðum, ið skulu flyta samfelagið inn í framtíðina, so at tey hava førleika at átaka sær henda leiklutin til gagns fyri øll? Tann allarfyrsta og týdningarmesta fortreytin er atgongdin til tilfar, miðling av tilfari og neyðug venjing av lesiførleika. Tí verða vit noydd at taka lesivanakanningarnar í álvara, ið greitt vísa á, at týdningarmesta fortreytin er álvarsliga hótt, nevniliga lesiførleikin og atgongdin til føroyska skriftmálið.

Vit kunnu staðfesta, at skúlin hevur eina nógv størri og øðrvísi uppgávu og avbjóðing í dagsins samfelag borið saman við fyri fáum árum síðani, tí lesingin, mál- og mentanarflutningurin í stóran mun eru broytt. Bæði kvantitativa- og kvalitativa lesivanakanningin staðfesta, at lesingin er vorðin heimleys.

> *„Bara tey, sum elska-elska at lesa, gera tað.“*
>
> *(sitat frá næmingi)*

# Keldulisti


Pirls, *Progress in International Reading Literacy Study*, sí https://www.uis.no/nb/lesesenteret/pirls

*Kanning av lesivanum hjá børnum 2017/18 – Frágreiðing*, Lydia Didriksen, Turið Kjølbro, Sissal M. Rasmussen og Marjun Ziskason, sí https://www.malmenning.fo/kanning-av-lesivanum/

Átøk at fremja lesihugin – Føroyar lesa, sí https://lms.cdn.fo/media/12074/%C3%A1t%C3%B8k-at-fremja-lesihugin-f%C3%B8royar-lesa.pdf?s=f8SGt1H9CeuUbQZOcNwHX2KyyOY

Lítil áhugi at granska í skúlaviðurskiftum, sí http://www.skulabladid.fo/l%C3%ADtil-%C3%A1hugi-at-granska-%C3%AD-sk%C3%BAlavi%C3%B0urskiftum

Norsk kanning, sí https://forskning.no/skole-og-utdanning-barn-og-ungdom-nasjonalt-utviklingssenter-for-barn-og-unge-nubu/gode-prestasjoner-i-barneskolen-kan-gi-bedre-psykisk-helse/1193735